<table>
<tr><td rowspan="2">Býráðsfundur<br>30. april 2020</td><td>Blað nr.: 269</td></tr>
<tr><td>Formansins merki:</td></tr>
</table>

# GERÐABÓK

**Dato:** 30. april 2020 **Kl**. 18:00
**Stað:** Býráðssalurin/Teams
**Málsnr: 63/20 – 86/20**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Jóan Petur Hentze
Eyðfríð Jacobsen
Bogi Jacobsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 63/20 | 20/00205-1 | Mál beind í nevndir 2020 | 272 |
| 64/20 | 20/00768-1 | Ársroknskapur og grannskoðanarprotokoll fyri 2019 hjá Westward Ho | 274 |
| 65/20 | 20/01020-1 | Søla av tveimum grundstykkjum í útstykkingini í Hamrabøi, matr. nr. 91m og 91x, Kollafirði | 276 |
| 66/20 | 19/00063-6 | Grundstykki matr.nr. 255db, Kirkjubøur - Argir. Keypari vil lata grundstykkið innaftur. | 278 |
| 67/20 | 20/00746-4 | Víðarisøla matr.nr. 138cy, Hoyvík. | 280 |
| 68/20 | 20/00097-1 | Ústykking á Velbastað | 282 |
| 69/20 | 20/01297-1 | Endurgjald til eigarafelagið Hoyvíkshædd fyri luttøku í útstykking | 285 |
| 70/20 | 20/01192-2 | Áheitan um broyting av leigusáttmála viðvíjandi neysti á Hvítanesi á matr. nr. 122, Hoyvík | 287 |
| 71/20 | 20/01084-2 | Viðvvíkjandi nevndarvali til nevndina í p/f Visit Faroe Islands | 289 |
| 72/20 | 20/00822-4 | Nevndarval til aðalfundin í Felagnum Tórshavn 2020 | 291 |
| 73/20 | 14/04448-33 | Deksbáturin Fram TN2 | 293 |
| 74/20 | 20/00824-4 | Bráfeingisjáttan til neyðuga útgerð - Barnatannrøktin | 300 |
| 75/20 | 20/00923-1 | Nýggj upptøkureglugerð til dagstovnar til børn í aldrinum 0 til 7 ár | 302 |
| 76/20 | 20/01127-1 | Upptøkureglugerð til frítíðarskúla í Tórshavnar kommunu | 304 |
| 77/20 | 15/01400-1 | Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl | 306 |
| 78/20 | 20/01119-3 | Tórshavnar býarsavn: Ásetan av atgongumerkjaprísum | 316 |
| 79/20 | 19/00423-2 | Venjingarhøli í Kollafirði | 318 |
| 80/20 | 19/04413-1 | Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu: Støðan og framtíðar løgutørvur | 322 |
| 81/20 | 20/00776-1 | Innkomuvegurin kommunali parturin | 330 |
| 82/20 | 18/00992-1 | Lendisgøtur | 333 |
| 83/20 | 19/00746-2 | Umsókn um yvirtøku av vegi matr. nr. 699p, Lítlatrøð, Tórshavn | 336 |
| 84/20 | 20/01286-1 | Endurgjald av barnaansingargjaldi - Korona | 338 |
| 85/20 | 16/04617-1 | Val av einum limi og tiltakslimi í SEV-nevndina | 340 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 86/20 | 20/00203-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2020 | 342 |

**Til viðgerðar**

## 63/20 Mál beind í nevndir 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 3/20 | 20/00205-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 25/20 | 20/00205-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 63/20 | 20/00205-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

| **Býráðsfundur**<br>30. april 2020 | Blað nr.: 274 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# 64/20 Ársroknskapur og grannskoðanarprotokoll fyri 2019 hjá Westward Ho

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Nevndin fyri Westward Ho | 24.02.2020 | 2/20 | 20/00768-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 66/20 | 20/00768-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 64/20 | 20/00768-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Roknskapurin fyri 2019 verður latin Tórshavnar kommunu til góðkenningar sambært § 6 í reglugerð fyri Westward Ho.

Grannskoðaður roknskapur fyri Westward Ho fyri 2019 verður framlagdur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Nevndin fyri Westward Ho 24. februar 2020:** Roknskapurin góðkendur og undirskrivaður.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Roknskapurin góðkendur.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

# 65/20 Søla av tveimum grundstykkjum í útstykkingini í Hamrabøi, matr. nr. 91m og 91x, Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 71/20 | 20/01020-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 65/20 | 20/01020-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Kommunan eigur tvey grundstykkir í útstykkingini á Hamrabøi, Kollafjørður.

Talan er matrikklarnar
91 m søluprísur kr. 264.145,62
91 x søluprísur kr. 239.779,18

Snarskivan hevur í tveimum umførum útlutað stykkir í útstykkingini so hvørt sum grundstykkir eru komin innaftur.

Hetta varð gjørt á tann hátt, at tey sum ikki fingu tillutað grundstykkir í fyrsta umfari, fingu møguleika til at verða við í nýggjari útlutan.

Øll sum teknaðu seg til upprunaligu útlutanina, hava fingið grundstykkið í boðið.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin**.** Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at selja grundstykkini í fríðari sølu til ásettan minstaprís.

matr.nr. 91m minstiprísur kr. 264.145,62
matr.nr. 91 x minstiprísur kr. 239.779,18

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

# 66/20 Grundstykki matr.nr. 255db, Kirkjubøur - Argir. Keypari vil lata grundstykkið innaftur.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 89/20 | 19/00063-6 |
| 2 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 66/20 | 19/00063-6 |

**Upprunin til málið**: Keypari ynskir at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Keyparar hava fingið tillutað eitt grundstykkið í ústykkingini Klingurstjørn 2. Talan er um matr.nr. 255db. Keypsprísur er kr.  691.542,05 harav hava keyparar goldið ávegisgjald kr. 341.000,00 og hava eisini undirskrivað fyribils skeytið. Tey hava ikki goldið gjald 2. og hava heldur ikki skrivað undir endaligt skeytið. Vísandi til at tey hava avgjørt ikki at keypa grundstykkið.

Í  praksis verða tílík mál har keypari vil lata stykkið innaftur avgreidd á tann hátt, at kommunan lutar innkomnu stykkini útaftur millum teirra sum ikki hava fingið grundstykkið tillutað í samband við upprunaligu útlutanina.

Og tá ið nýggjur keypari er til stykkið, verður " gamli " keyparin leysgivin skeytinum, og fær keypspeningin ( ella tað upphædd sum viðkomandi hevur goldið kommununi ) afturgoldið.

Kommunan útlutar tó ikki stykkini so hvørt sum tey koma innaftur, tí tað verður alt ov arbeiðiskrevjandi.

Kommunan skal tá ið hvørjum einstøkum føri, seta seg í samband við øll tey sum ikki hava fingið grundstykkið tillutað í samband við útlutan. Hesi skulu hava tíð at hugsa seg um og at svara, um tey framvegis vilja verða við í møguligari útlutan. Kommunan skal kanna um viðurskiftini framvegis eru í lagi hjá viðkomandi í mun til reglugerðina.

Tí hevur man ikki útlutað innkomnu grundstykkini so hvørt sum tey eru innkomin, men hevur bíðað við útlutan til man hevur fleiri stykkir.

Ta óhepna fyri eigaran í hesum føri var, at kommunan beint áðrenn kommunan fekk  fyrispurningin um at kunna lata stykkið innaftur, hevði útlutað 10 innkomin grundstykkir útaftur. T.v.s. at hetta grundstykki ikki kom við í hesa útlutan.

Í løtuni er bert tað eina grundstykkið tøkt til útlutan í útstykkingini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa stykkið aftur, og at luta tað útaftur sambært reglugerð.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

# 67/20 Víðarisøla matr.nr. 138cy, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 69/20 | 20/00746-4 |
| 2 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 67/20 | 20/00746-4 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Viðvíkjandi matr.nr. 138cy, Hoyvík. Karlamagnusarbreyt.
Grundstykkið er 782m2, harav byggifeltið er 395m2.

Verandi eigari matr.nr. 138dt, selur grundstykkið til Sp/f matr.nr. 138cy, sum ætlandi fullførir verkætlanina um bygging av íbúðarbúarbygningi.

Sambært grein 3 í upprunaskeytinum, sum er tinglýst 27.06.2017, bindur eigarin seg til at byrja sína bygging innan 2 ár frá tí, at skeytið er tinglýst, og kann eigarin ikki selja stykkið víðari uttan góðkenning frá kommununi, fyrr enn bygningur sum kommunan kann góðkenna, er bygdur á byggifeltið frá Karlamagnussarbreyt og í minsta lagi 6 metrar inn.

Servituttirnir verða teir somu sum í upprunaskeytinum, herundir eisini servituttir um byggifreist.
Søluprísurin verður samsvarandi uppruna skeytinum kr. 914.70,27

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin, skeytisásetingar.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Frávik ímun til servituttir.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**. Kort. Umsókn.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarliga/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at góðkenna víðarisøluskeytið.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

## 68/20 Útstykking á Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 21/20 | 20/00097-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 19/20 | 20/00097-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 45/20 | 20/00097-1 |
| 4 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 24.02.2020 | 4/20 | 20/00097-1 |
| 5 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 29.04.2020 | 6/20 | 20/00097-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 68/20 | 20/00097-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.04.2020 | 83/20 | 20/00097-1 |
| 8 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 30.04.2020 | 7/20 | 20/00097-1 |

**Upprunin til málið:**
Býráðið hevur 20.06.2019 samtykt raðfestingar fyri kommunalar útstykkingar, har økið á Velbastað er raðfest í 2019-2020, sí skjal 19/02316-1 kommunalar útstykkingar.
Út frá omanfyristandandi verður tískil mett, at umsitingin eigur at fara undir at kanna møguleikan at stykkja út á Velbastað (sí kortskjal: Øki at útstykkja_kortskjal, journal nr. 20/00097-3).

Í 2019 vóru 249 íbúgvar á Velbastað, umleið 86 húskir. Velbastaður hevur seinastu árini veri bygdin í Tórshavnar kommunu við størsta tilflytaratali. Nógvu útstykkingarnar á Velbastað hava hálað til sín barnafamiljur og er Velbastaður í dag ein barnarík bygd. Vanligur leistur er at leggja nýggjar býlingar tætt at verandi býlingum, soleiðis at, vegir, rør og streymur kunnu gagnnýtast. Hesin leistur er tó torførur at fylgja á Velbastað, tí lendið er bratt, velt lendi og fjós er millum teir eldru býlingarnar, og gamli bygdarvegurin er illa egnaður til meira ferðslu. Tað eru trý nýggj bústaðarøki á Velbastað; undir Borgarhálsi, Gerðisbreyt og á Stórheyggi. Mett verður at hesi øki eru hóskiliga gagnnýtt í mun til brattlendi og tøkum byggilendi. Nógvi bøurin og fjósini ger at tað illa ber til at vaksa um bygdina millum teir eldru býlingarnar. Í byggisamtyktini fyri Velbastað er eitt upplagt øki tí, økið eystanfyri vegin; Norðuri í Trøð, sum eisini er lagt út sum sethúsaøki. Húsini á Velbastað eru vanlig sethús, og ongin tvíhús, rað- ella ketuhús eru í bygdini. Tí sampakkar hetta væl við verandi bygdadám.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Talan er um matriklarnar 3a og 1a. Tilsaman áleið 8300 fermetrar. Her er lendið munandi slættari enn býlingurin omanfyri; Undir Borgarahálsi. Væl ber til at binda í vatn og kloakkleiðingarnar, ið liggja oman gjøgnum matrikul 3a.
Vegurin; Norðuri á Trø er ein lutfalsliga smalur vegur. Vert er tí at kanna um vegurin kann flytast, breiðkast, ella bústaðarvegur kann gerast, soleiðis at hann kann koma at ganga oman av svinginum Norðuri á Heyggi og ígjøgnum byggilendi ístaðin.
Skitsa er gjørd av økinum, har uppskot til bústaðarveg er teknað við. Væl ber til at stykkja eini 12 grundstykkir út, ið liggja ávikavist um 400 til 600 fermetrar (sí Kort journal nummar 20/00097-2).

Umsitingin metir, at lættasti máti at fáa til vega byggiøki á Velbastað er, at kommunan ognar sær lendið frá Føroya Jarðargrunni.
Tosað varð við Landsverk um málið. Landsverk tekur undir við at byggjast kann fram við vegnum, men kann vera at Landsverk seta treytir um frástøðu til vegin.
Um so er, verður møguliga neyðugt at kommunan yvirtekur vegin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Sambært byggisamtyktini fyri Velbastað er loyvt at byggja sethús við upp til tveimum íbúðum. Við serloyvi frá byggivaldinum, er loyvt at byggja tvíhús, rað- ella ketuhús.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Kunnað varð um ætlan um útstykking á Velbastað á borgarafundi á Velbastað 06.11.2019. Festarin gjørdi vart við á fundinum, at hann fer at mótmæla ætlanini.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kommunalar útstykkingar journal nr. 19/02316-1
Kort journal nummar 20/00097-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | x | | x |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | x | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at umsitingin fær heimild til at fara í tilgongd at keypa matrikul 1a og 3a frá Búnaðarstovuni, at umsitingin ger uppskot til skipan av økinum, umframt uppskot til hvussu víðari skal farast fram og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

Málið beint í býráðið.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 24. februar 2020:** Staðbundna nevndin tekur ikki undir við uppskotinum, men vil hava eina heildarætlan fyri báðar bygdirnar.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 29. apríl 2020:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. apríl 2020:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 15. januar 2020.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til at lurta eftir staðbundnu nevndini og at sleppa útstykkingarætlanini á staðnum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 30. apríl 2020:** Staðbundna nevndin heldur fast við samtyktini frá 24. februar 2020.

Eyðfinnur í Búðini var ikki við til hetta málið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Tikið av skrá.

# 69/20 Endurgjald til eigarafelagið Hoyvíkshædd fyri luttøku í útstykking

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 93/20 | 20/01297-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 69/20 | 20/01297-1 |

**Upprunin til málið:**
Sáttmáli millum Tórshavnar kommunu og Eigarafelagið Hoyvíkshædd frá 13. februar 2003 og bygging av umlættingar- og rehabiliteringsdepli á matr. nr. 135qy, Hoyvík.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tá ið farið varð undir útstykkingina í Hoyvíkshaganum legði Tórshavnar kommuna seg á eitt lendi á matr. nr. 135qy, ið ætlanin var at nýta til dagstovn.

Avtala varð gjørd millum eigarafelagið og Tórshavnar kommuna tann 13. februar 2003, har ásett varð, at kommunan rindar fyri luttøku sína í útstykkingini á sama hátt sum allir aðrir eigarar í útstykkingini, t.e. fyri vegir og allar aðrar innleggingar í sambandi við ústykkingararbeiðið.

Kommunan rindaði tá fyri 2.500 m², og tá ið kommunan hevði tikið støðu til, hvat lendið skuldi nýtast til, skuldu samráðingar verða millum eigarafelagið og kommununa um, hvussu nýtslan og gjalding skuldu leggjast til rættis. Ásett varð í avtaluni, at um økið hjá kommununi varð nýtt til barnagarð, skuldi økið – uttan mun til, um størri vídd varð nýtt – avroknast við 2.500 m².

Tá ið farið varð undir at byggja umlættingar- og rehabiliteringsdepilin URD á grundøkinum, gjørdi eigarafelagið vart við avtaluna frá 2003. Økið til URD er til víddar 6.672 m², og eru hetta 4.172 m² størri enn upprunaliga avroknað fyri, um økið skuldi brúkast til barnagarð.
Samráðingar hava verið við Eigarafelagið Hoyvíkshædd samsvarandi ásetingunum í avtaluni frá 2003, og partarnir eru komnir ásamt um, at kommunan skal rinda fyri luttøku í útstykkingini við teimum 4.172 m², ið fara upp um 2.500 m².

Gjaldið, ið Tórshavnar kommuna skal rinda fyri luttøku í útstykkingini, er eftir samráðingar við eigarafelagið ásett til kr. 2.246.086, og hevur eigarafelagið játtað, at kommunan rindar nevndu upphædd í trimum eins stórum gjøldum á kr. 749.694. 1. gjald, tá ið avtalan er undirskrivað. 2. gjald 1. januar 2021 og triðja gjald 1. januar 2022.

Gjaldið tekur støði í, at Tórshavnar kommuna rindar kr. 593,50/m² fyri 4.172 m² við frádrátti fyri ávísar kostnaðir, ið kunnu tengjast beinleiðis at byggingini av URD.

Útreiðslan til semjuna við eigarafelagið var ikki kend, tá ið mett varð um kostnaðin av samlaða projektinum, og tí er hædd ikki tikin fyri hesi útreiðslu í projektinum. Vísir tað seg, at tørvur verður á meirfígging til verkætlanina orsaka av hesi semju, verður umbøn um eykajáttan løgd fyri fíggjarnevndina.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Avtala millum Tórshavnar kommunu og Eigarafelagið Hoyvíkshædd, dagfest 13. Februar 2003.
Upprit frá Jógvan Páll Lassen, sakførara, um avtaluna millum Tórshavnar kommunu og Eigarafelagið Hoyvíkshædd.
Teldupostsamskifti millum Tórshavnar kommunu og Eigarafelagið Hoyvíkshædd um semju um gjaldið hjá Tórshavnar kommunu fyri luttøku í útstykkingini.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | 2.246.086 | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin fyri Stjórnarskrivstovuna mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at góðkenna fyriliggjandi semjuuppskot millum Tórshavnar kommunu og Eigarafelagið Hoyvíkshædd og at játta kr. 2.246.086 av verkætlanini URD.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti, vísandi til, at endurgjaldið dýrkar munandi um URD-verkætlanina og vísandi til, at teirra støða er, at økið áttið at verið nýtt til dagstovn sambært upprunaligu ætlanini, og hevði einki endurgjald tá verið goldið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein og vísir minnilutin í hesum sambandi á, at endurgjaldið dýrkar munandi um URD-verkætlanina, og um økið varð nýtt til dagstovn sambært upprunaligu ætlanini, hevði einki endurgjald verið goldið.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. april 2020 | Blað nr.: 287<br><br>Formansins merki: |

## 70/20 Áheitan um broyting av leigusáttmála viðvíjandi neysti á Hvítanesi á matr. nr. 122, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 94/20 | 20/01192-2 |
| 2 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 70/20 | 20/01192-2 |

**Upprunin til málið:**
Leigusáttmáli uppá grundøkið matr.nr. 122, Hoyvík.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Advokatur søkir vegna ein av arvingunum um at yvirtaka sáttmálan uppá grundøkið, har neystið stendur.

Viðkomandi, sum hevði sáttmálan, er deyður.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Sáttmáli frá 2010**.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Leiðarin á stjónarskrivstovuni og kommunustjórin mæla til at ein av arvingunum kann yvirtaka sáttmálan við einum nýggjum 10 ára sáttmála.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

# 71/20 Viðvvíkjandi nevndarvali til nevndina í p/f Visit Faroe Islands

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 71/20 | 20/01084-2 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Vísandi til § 3 í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/F Visit Faroe Islands, sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 20. desember 2017, verður nevndin í
P/F Visit Faroe Islands mannað við 7 nevndarlimum, harav Tórshavnar Kommuna tilnevnir 1 umboð.

Lutfalsval.

§ 3. Nevndin skal vera mannað við 7 limum. Limirnir skulu umboða Ferðavinnufelagið, ferðaflutningsfeløg, kommunurnar og mentanina/ítróttin.
Stk. 2. Nevndin skal vera sett saman av lyklapersónum innan ymsu økini, og nevndin skal samlað hava teir fakligu førleikar, sum skulu til fyri at røkka endamálinum í § 2.
Stk. 3. Aðalfundurin velur nevndarformannin. Aðalfundurin velur hinar nevndarlimirnar soleiðis:
1) Eitt umboð fyri Ferðavinnufelagið, umboðandi ferðavinnuna í Føroyum, herundir gistingarhús, matstovuvinnu, ferðasmiðir v.m.
2) Tvey umboð fyri ferðaflutningsfyritøkur
3) Eitt umboð frá Tórshavnar Kommunu
4) Eitt umboð fyri kommunurnar uttan fyri Tórshavnar kommunu
5) Eitt umboð fyri mentanina ella ítróttin
6) Eitt umboð fyri landsstýrismannin
Stk. 4. Áðrenn nevndin setur stjóra, skal landsstýrismaðurin verða kunnaður.
Stk. 5. Landsstýrismaðurin góðkennir starvsskipan fyri nevnd og stjórn felagsins, eins og landsstýrismaðurin skal góðkenna samsýningina til nevnd og lønina til stjórn felagsins.

Í viðmerkingunum til § 3 í lógini er í lógaruppskotinum ásett, at *"nevndin skal vera eitt avgerðarforum, sum stingur út í kortið fyri føroyska ferðavinnu. Tað er týdningarmikið, at tað eru professionell lyklaumboð (t.d. stjórar) innan ymsu økini, sum vegna felag ella myndugleika í størst møguligan mun hava avgerðarheimildir."*
Víðari verður tað nevnt í serligu viðmerkingunum, at *"Tórshavnar Kommuna tilnevnir eitt umboð fyri kommununa, sum umboðar leiðslu ella annan lyklapersón í kommununi, og sum hevur kunnleika til ferðavinnuna í høvuðsstaðnum."*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/F Visit Faroe Islands sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 20. desember 2017

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:** Fyrisitingarstjórin mælir býráðnum til at velja 1 lim í nevndina í P/F Visit Faroe Islands.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá borgarstjóranum at velja Bjørgfríð Ludvig í nevndina í P/F Visit Faroe Islands, ið varð einmælt samtykt.

# 72/20 Nevndarval til aðalfundin í Felagnum Tórshavn 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 72/20 | 20/00822-4 |

**Upprunin til málið:**
Felagið Tórshavn (Visit Tórshavn) hevur aðalfund tann 13. mai 2020.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Nevndarlimur Sóley Hammer + tiltakslimur Eirik Suni Danielsen standa fyri vali.
Býráðið skal velja ein nevndarlim og ein tiltakslim.

Í viðtøkunum stendur millum annað um nevndina:
*"Nevndin telur 5 limir, sum sita fyri 2 ár í senn. Annaðhvørt ár standa 2 nevndarlimir fyri vali, og annaðhvørt ár standa 3 limir fyri vali.*
*2 nevndarlimir verða valdir beinleiðis av Tórshavnar kommunu og 3 verða valdir av Felagnum Tórshavn á aðalfundi.*
*Teir 2 nevndarlimirnir, ið Tórshavnar kommuna velur, og 2 av nevndarlimunum, ið Felagið Tórshavn velur, skulu vera persónar, sum eru leiðarar ella stjórar innan ferðavinnu, handilsvinnu, matstovuvinnu og møguliga aðra vinnu, sum hevur ein viðkomandi leiklut í ferðavinnu høpi. 3. nevndarlimurin, sum Felagið Tórshavn velur, umboðar Felagið Tórshavn, og kann verða valdur millum limir felagsins ella umboðandi almennan ella privatan stovn, savn, mentanarlív ella líknandi. Nevndarlimir kunnu ikki vera býráðslimir. Nevndarlimir kunnu verða valdir aftur.*
*Fyri hvønn nevndarlim verður tiltakslimur valdur.*
*Nevndin skipar seg sjálva við formanni og næstformanni. Nevndin er viðtøkufør, tá í minsta lagi 3 limir eru á fundi, harav ein skal vera formaðurinharav annar skal verða valdur av Tórshavnar kommunu, og 3 nevndarlimir verða valdir fyri 2 ár".*

Kommunan valdi í 2018 nevndarlimir eftir lutfalsvali.
Samgongan skal velja nevndarlim og tiltakslim hesaferð.

Fylgjandi persónar sita í nevndini í dag:

Herleif Hammer, mailto:herleifh@savn.foTjóðsavnið
John Mikkelsen, Gist&Vist
Theresa Turiðardóttir Kreutzmann, Commit
Sóley Heradóttir Hammer, Hugskotið
Henny á Líknargøtu, Smyril-Line

Junie Hansen/vegna ferðavinnuna, Smyril-Line
Eirik Suni Danielsen, (arbeiddi á Gjáargarði)
Rúna Erlandsdóttir, AtlanticAirways
Helgi Michelsen,Tjóðsavnið
Eyðna av Fløtum, Gist&Vist

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir Býráðnum til at velja 1 nevndarlim og 1 tiltakslim í nevndina fyri Visit Tórshavn.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Atkvøtt varð um uppskot frá Anniku Olsen at velja Sóley Heradóttir Hammer sum fastan lim og Eirik Súni Danielsen sum tiltakslim í nevndina í Visit Tórshavn, ið varð einmælt samtykt.

## 73/20 Deksbáturin Fram TN2

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 152/16 | 14/04448-33 |
| 10 Mentamálanevndin | 07.06.2019 | 179/19 | 14/04448-33 |
| 11 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 269/19 | 14/04448-33 |
| 12 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 303/19 | 14/04448-33 |
| 13 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 93/20 | 14/04448-33 |
| 14 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 96/20 | 14/04448-33 |
| 15 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 73/20 | 14/04448-33 |
| 2 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 229/16 | 14/04448-33 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 322/16 | 14/04448-33 |
| 4 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 389/16 | 14/04448-33 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 32/17 | 14/04448-33 |
| 6 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 73/17 | 14/04448-33 |
| 7 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 257/17 | 14/04448-33 |
| 8 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 274/17 | 14/04448-33 |
| 9 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 9/18 | 14/04448-33 |

**Málslýsing:**
Loyvi um at virka fyri at keypa dekksbátin Fram, frá Søren Pram Sørensen.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Samtykt at taka upp samráðingar við Søren Pram Sørensen við tí fyri eyga at keypa dekksbátin Fram.

**Fíggjarnevndin 25. juli 2011:** Kunna varð um málið.

**Ískoyti:**
Báturin er bygdur í 1923. Sambært eigara, er báturin væl røktur og í góðum standi.

Fundur hevur verið við umboð fyri eigaran, ið vil selja kommununi bátin fyri kr. 700.000.

Eigarin hevur játtað at fáa tekniska meting til vega frá Mourits Mohr og eina greining frá skipaeftirlitinum.

Fyri at kunna reka bátin má hann setast á fíggjarætlan kommununnar, m.a. fyri at kunna rinda viðlíkahald, olju, legugjald, tryggingargjald og bedingseftirlit eina ferð um árið.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til at keypa bátin fyri kr. 700.000, treytað av at tekniska metingin og greiningin frá skipaeftirlitinum eru nøktandi.

Eisini verður mælt til at játta neyðuga peningin til raksturin

Mælt verður eisini til, at stovna eitt felag, líknandi sluppvinafelagnum, at taka sær av dagliga rakstrinum.

**Fíggjarnevndin 8. september 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at keypa dekksbátin Fram.

Samtykt at játtað kr 800.000 av konto 20910 til keypið og raksturin av bátinum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 8. september 2011:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

**Ískoyti**

Umsitingin hevur roynt at lýst fyri at vita um áhugaði eru fyri at yvirtaka M/B Fram, men er onki komið í lag hvørki innanlands ella uttanlands.

Umsitingin metir at tíðin er komin til at fáa bátin burturbeindan. Hugsað verður antin at skera hann upp ella at fáa loyvi til at søkkja bátin. Báðar loysnirnar innibera ávísar útreiðslur, ið verða dekkaðar av kontu 5366 Stuðul annars.

Alternativt ber til at umhugsa verkætlan har hann verður settur varðandi uppá land, men vil tað eisini innibera týðandi kostnaðir.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentanmálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at burturbeina M/B Fram. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.
Greiddu ikki atvøðu: Rúni Djurhuus og Jákup Símun Simonsen.

**Ískoyti.**
Báturin er skrásettur í skipaskránni sum stuttleikabátur og kann ikki brúkast til vinnu.

Higartil hava Regin Torkilsson og Finnur Ludvig saman við pápa og pápabeiggjum hjá Regini tikið sær av bátinum.

Báturin hevur verið brúktur í jólamánaðinum og hevur verið við á tveimum stevnum. Millum annað í regattasiglingini fyri træskip. Harumframt hevur báturin veri opin fyri almenninginum á ólavsøku.

NámX (Evald Rasmussen) hevur ætlanir um at nýta bátin til fiskibreytina.

Um hetta skal gerast veruleiki, er neyðugt, at báturin verður góðkendur til brúkið. Kannað verður í løtuni hjá Skipasýninum, hvørji krøv verða, og kann eisini væntast, at íløgur skulu gerast í bátin.

Tað er tí trupult at áseta hvussu nógvur peningur skal til fyri at kunna reka bátin, tí tað veldst um, hvussu nógv báturin verður brúktur, og eisini til hvørjar ábøtur skulu gerast.

Rakstrarútreiðslurnar í 2012 vóru um kr. 60.000,00.

Eingin inntøka er til bátin, men hann fekk stuðul í 2012 frá Regattasiglingini.

Um NámX skal brúka bátin, verður talan um øktar útreiðslur til olju – íløgur, trygdarútgerð o.s.fr.

Enn er eingin niðurstøða gjørd hesum viðvíkjandi, men neyðugt er við eini rakstrarfígging undir øllum umstøðum.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at flyta kr. 75.000,00 til rakstur og íløgur av deksbátinum Fram av konto 20910 til konto 5366, og annars at taka hædd fyri deksbátinum Fram í fíggjarætlanini 2014.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Ein áhugabólkur (umleið 4 persónar) hevur sýnt áhuga fyri at taka sær av bátinum ímóti at fáa rætt til at brúka hann sambært nærri treytum.

Løgdeildin og mentamáladeildin hava verið í samskifti við áhugabólkin um bátin og samskift við træsmið við atliti til eina støðulýsing/kanning í sambandi við neyðugar umvælingar av bátinum (sí hjálagt skjal). Træsmiðurin metir, at báturin er í ringum standi. Í løtuni tekur løgdeildin sær av bátinum saman við mentamáladeildini.

Sum sæst, er metingin (við fyrivarni), at tilfarið til umvælingar er 56 tkr. umframt MVG. Av tí at talan í stóran mun er um arbeiði, sum krevur fakkunnleika innan bátasmíð, og áhugabólkurin neyvan kann fara undir tað mesta av hesum einsamallur, er neyðugt at meta um kostnaðin fyri arbeiðsløn at gera

neyðuga arbeiðið. Mett verður (við fyrivarni), at lutfallið millum tilfar og arbeiðsløn í hesum føri er millum 1 til 3 til 1 til 4, t.v.s. at samlaði kostnaðurin lættliga kann gerast einar 150 tkr. til 200 tkr. Raksturin av bátinum higartil hevur verið fíggjaður av kontu 5366 Stuðul annars. Hartil kemur so annað umvælingararbeiðið serliga innanborðs, máling o.t., ið áhugabólkur eigur at kunna taka sær av.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, løgdeildarleiðarin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini í fyrsta lagi til at taka støðu til at selja bátin og í øðrum lagi at taka støðu til, um farast skal undir víðari tilgongd at gera leiguavtalu við áhugabólkin og samstundis fara undir neyðugar umvælingar og fíggja útreiðslurnar av kontu 5366 Stuðul annars.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Samtykt at selja bátin.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at gera eina støðulýsing av bátinum, ið verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina.

Støðulýsing er gjørd av bátinum og hevur kommunan fingið tilboð frá Skipasmiðju uppá umvæling av bátinum.

Tilboð samlað uttan mvg. Kr. 1.396.400,00 + transport og leigu av krana.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin mælir til at selja bátin.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur ikki undir við at selja bátin men at finna áhugabólk at taka sær av bátinum, so hann kann vera partur av býarmentanini.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Atkvøddu blankt: Tróndur Sigurdsson og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Báturin hevur verið lýstur til sølu uttan at nakað boð kom og sera lítil áhugi var fyri bátinum.

Samskift hevur síðan verið við Bátafelagið um møguliga yvirtøku, ið eisini hevði tænt kommunala áhuganum at varðveitt bátin í Havn.

Nevndin í Bátafelagnum hevur boðað frá, at felagið ikki kann átaka sær munandi útreiðslur tey komandi 3-4 árini. Um felagið skal yvirtaka Fram TN 2, kann hetta bert gerast um Tórshavnar Kommuna játtar at gjalda fyri ístandgerð av bátinum.

Felagið hevur áhuga, men endaliga avgerðin kann bert takast á limafundi.

Um Tórshavnar Kommuna ynskir at Tórshavnar Bátafelag skal yvirtaka Fram TN 2 verður neyðugt at viðgera keypstreytir, fígging av ístandgerð og fígging til rakstur.

Av tí at báturin er lítil eru inntøkumøguleikarnir avmarkaðir. Neyðugt er tí at kommunan stuðlar viðlíkahaldinum, um báturin skal varðveitast. Báturin stendur á landi og er ikki ráðiligt at hann verður standandi ov leingi afturat.

Kommunan hevur síðan keypi brúkt upp til nakrar tíggjutúsund um árið til rakstur og viðlíkahald.

Kommunan fekk í 2016 tvær metingar av, hvat tað kostar at seta bátin í stand. Hesar liggja í málinum. Stóri munurin á metingunum skyldast, at meðan onnur er ein heildar ístandsetan er hin fyri at fáa bátin at sigla, ið er mest átroðkandi her og nú fyri at báturin ikki skal farast. Sambært metingini vildi neyðuga tilfari fyri at fáa bátin at sigla kosta 56.000 kr. uttan mvg. og helst er nakað afturat hesi upphædd.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og løgdeildarleiðarin mæla mentamálanevndini til taka støðu til um farast skal undir samráðingar við Bátafelagnum um at lata teimum bátin og at gera avtalu um tey viðurskifti, ið felagið hevur víst á.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Útsett.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Samtykt at lýsa bátin til sølu/avhendan í Føroyum og í øðrum lagi kanna um áhugi er í Íslandi.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur roynd at lýst fyri at vita um áhugaði eru fyri at yvirtaka M/B Fram, men er onki komið í lag hvørki innanlands ella uttanlands.

Umsitingin metir at tíðin er komin til at fáa bátin burturbeindan. Hugsað verður antin at skera hann upp ella at fáa loyvi til at søkkja bátin. Báðar loysnirnar innibera ávísar útreiðslur, ið verða dekkaðar av kontu 5366 Stuðul annars.

Alternativt ber til at umhugsa verkætlan har hann verður settur varðandi uppá land, men vil tað eisini innibera týðandi kostnaðir.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at burturbeina M/B Fram. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 07. juni 2019:** Samtykt at kalla nevndina fyri Felagið føroysk træ/seglskip inn á næsta fund.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Umboð fyri Felagið Føroysk Træseglskip greiddu frá. Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, taka undir við tilmælinum til fundin 7. juni 2019.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, taka ikki undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Umboð fyri Felagið Føroysk Træseglskip greiddu frá. Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, taka undir við tilmælinum til fundin 8. mai 2019.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, taka ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at lýsa alment við at báturin verður latin áhugaðum til ognar.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, mælir til at lýsa bátin alment til sølu.

**Ískoyti**
Eftir at lýst var av nýggjum um møguleikan at fáa M/B Fram til ognar uttan viðurlag er farin hevur ein áhugaður bólkur sýnt áhuga. Talan er um Johan Petersen v.fl., ið hava latið hjáløgdu frágreiðing.

Umsitingin metir at talan er um áhugaverdar ætlanir og sum eisini hava týðandi søguligt grundfesti. Mett verður hóskandi at hesin áhugabólkur fær møguleikan at ogna sær bátin. Báturin verður latin sum hann stendur á Argjum og uttan aðra váttan, ábyrgd ella binding fyri TK. TK hevur latið umsøkjaranum støðulýsing og metingar, ið eru í málinum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at lata áhugabólki við Johan Petersen v.fl. bátin M/B Fram til ognar uttan viðurlag. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

# 74/20 Bráfeingisjáttan til neyðuga útgerð - Barnatannrøktin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 02.04.2020 | 12/20 | 20/00824-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 97/20 | 20/00824-4 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 74/20 | 20/00824-4 |

**Upprunin til málið:**
Fráboðan frá tannlæknastjóranum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tannlæknastjórin boðar 12. februar 2020 frá, at stóra røntgenapparartið er gingið fyri, og at ráðiligt er ikki at umvæla tað. Talan eru 13 ára gamla útgerð, sum seinast varð umvæld fyri góðum ári síðani.

At henda útgerð ikki virkar ger, at tað er ikki møguligt at taka nøktandi tilfar, tá metast skal um í samband við tannrætting og um tenn og andlit búnast tey eiga. Hetta er týdningarmesta amboðið fyri at kunna taka røttu avgerðirnar um nær og hvussu farast skal fram – røntgenmyndir av øllum tonnunum og andlitið, umframt profll og hond røntgen.

Hitt røntgenapparat til tey lítli bíløtini er eisini farin at virka illa, tí fjórða hvør mynd er blonk. Harumframt er ein autoklavi frá 1998 óvirkin. Tveir aðrir eru, sum nýliga eru skiftir, men tørvur er á trimum. Autoklavar verða brúktir til sóttreinsan, har nýggjar rættningslinjur viðv. hygieinu mæla til vakuumatouklavar.

Tannlæknastjórin vísir á, at stovnurin hevur ikki fígging til endamálið, og at tørvur er á eykajáttan kr. 550.000, tá er flutningur, uppseting og mvg íroknað.

Vísandi til, talan er um bráðfeingisstøðu, har Barnatannrøktin ikki fær útint týdningarmiklar og lógarásettar partar av virkseminum, og sum kann ganga út yvir tannheilsuna hjá teimum børnum, ið tørva sertannlæknaviðgerð, er avgjørt at geva tannlæknastjóranum heimild at útvega útgerðina alt innanfyri kr. 550.000, og eftirfylgjandi at leggja mál um eykajáttan til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Lóg um barna- og ungdómstannrøkt

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mett verður, at til ber ikki hjá trivnaðarnevndini at fíggja kr. 550.000 av øðrum kontum, sum nevndin varðar av á grein 2.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir trivnaðarnevndini til at heita á fíggjarnevndina um eykajáttan kr. kr. 550.000 til kontu 2310 Barnatannrøktin til útvegan av nýggjari útgerð.

**Trivnaðarnevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Vísast kann á fígging til útgerðina til Barnatannrøktina av avlopi í fyrisitingini 2019 soleiðis, kr. 145.000 av 1310 Býráðsskrivstovan kr. 200.000 av 1317 Heilsu- og umsorganarfyrisitingin og kr. 205.000 av 1313 Tekniska fyrisiting.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

# 75/20 Nýggj upptøkureglugerð til dagstovnar til børn í aldrinum 0 til 7 ár

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 65/20 | 20/00923-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 75/20 | 20/00923-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 75/20 | 20/00923-1 |

**Upprunin til málið:**
Endurskoðan av galdandi upptøkureglum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í tilgongdini at seta í verk talgildu plássbókingarskipanina BARN varð upptøkureglugerðin broytt (2017), sí mál 15/03760. Við støði í royndunum við BARN er tørv at orða ávísar reglur greiðari fyrst og fremst um foreldragjaldið, tí ósamsvar kann koma í samanhangin millum pláss og gjald við tí úrsliti, at nøkur foreldur hava goldið ov nógv (sí nevnda mál).

Í uppskotinum til nýggja upptøkureglugerð verður nú ásett, at gjaldið er beinleiðis tengt at aldrinum og tí ikki plássinum.

Aðrar smærri broytingar eru eisini gjørdar í upptøkureglunum. Eitt nú eru landafrøðiligu økini strikað. Tað merkir, at til ber hjá foreldrum at bóka pláss á øllum stovnunum í kommununi.

Orðingin um plásstrygd er broytt til, at kommunan miðar ímóti at tryggja øllum børnum pláss.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Dagstovnalógin § 4, stk. 2ásetir, at kommunur gera upptøkureglur, sum skulu góðkennast av landsstýrismanninum.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Uppskot til upptøkureglugerð

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| | Býráðsfundur<br>30. april 2020 | Blað nr.: 303 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja uppskotið til upptøkureglugerð.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

# 76/20 Upptøkureglugerð til frítíðarskúla í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 100/20 | 20/01127-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 98/20 | 20/01127-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 76/20 | 20/01127-1 |

**Upprunin til málið:**
Liva upp til lógaráseting og greiðar reglur.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Dagstovnalógin ásetir, at kommunur skulu gera upptøkureglur eisini til frítíðarskúlar. Upptøkureglugerð er frammanundan galdandi fyri dagstovnaøkið 0-6 ár.

Upptøkureglugerðin til frítíðarskúla fevnir um frítíðarskúla frá forskúlaflokki til 2. flokk.

Í Tórshavnar kommunu er frítt hjá foreldrum at velja fólkaskúla til barnið. Hetta er so aftur stýrandi fyri, hvønn frítíðarskúla, ið barnið kemur í. Td. fara børn í Skúlanum á Argjahamri í Frítíðarskúlan á Argjahamri o.s.fr.

Í upptøkureglugerðini eru harumframt reglur um uppsagnarfreistir, um innskriving í skúlaárinum, um børn við serligum tørvi, gjald og eftirstøður, og klagurætt. Hesar reglur eru tær somu sum fyri dagstovnaøkið 0-6 ár, men kemur frítíðarskúlaskipanin nú undir somu formligu ásetingar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Dagstovnalógin § 4, stk 2. Upptøkureglugerðin skal góðkennast av landsstýrismanninum.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Uppskot til upptøkureglugerð til frítíðarskúlar í Tórshavnar kommunu.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja uppskotið til upptøkureglugerð og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

# 77/20 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 83/15 | 15/01400-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 402/16 | 15/01400-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 329/16 | 15/01400-1 |
| 12 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 46/17 | 15/01400-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 16.10.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 14 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 77/17 | 15/01400-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 270/17 | 15/01400-1 |
| 16 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 8/18 | 15/01400-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 82/18 | 15/01400-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 277/18 | 15/01400-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 148/16 | 15/01400-1 |
| 20 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 52/18 | 15/01400-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 260/18 | 15/01400-1 |
| 22 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 214/18 | 15/01400-1 |
| 23 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 364/18 | 15/01400-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 350/18 | 15/01400-1 |
| 25 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 312/18 | 15/01400-1 |
| 26 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 157/19 | 15/01400-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 127/19 | 15/01400-1 |
| 28 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 106/19 | 15/01400-1 |
| 29 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 213/19 | 15/01400-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 225/16 | 15/01400-1 |
| 30 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 149/19 | 15/01400-1 |
| 31 Mentamálanevndin | 24.06.2019 | 223/19 | 15/01400-1 |
| 32 Mentamálanevndin | 03.07.2019 | 229/19 | 15/01400-1 |
| 33 Fíggjarnevndin | 03.07.2019 | 215/19 | 15/01400-1 |
| 34 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 185/19 | 15/01400-1 |
| 35 Mentamálanevndin | 15.04.2020 | 107/20 | 15/01400-1 |
| 36 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 100/20 | 15/01400-1 |
| 37 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 77/20 | 15/01400-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 174/16 | 15/01400-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 70/16 | 15/01400-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 179/16 | 15/01400-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.06.2016 | 46/16 | 15/01400-1 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 163/16 | 15/01400-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 314/16 | 15/01400-1 |

**Málslýsing**:
Til tess skjótt at fáa gongd á at betra umstøðurnar til almenna svimjing og kappingarsvimjing í høvuðsstaðarøkinum, verður bygginevndin til 50 m svimjihyl tikin av, og í staðin verður serstøk nevnd við tilvísing til fíggjarnevndina sett at gera allar neyðugar fyrireikingar til bygging av svimjihøll, herundir at:

- Gera neyva tørvslýsing av nýggjari svimjihøll til almenna svimjing og kappingarsvimjing, herundir lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum

- Gera uppskot til staðseting av nýggjari høll
- Gera byggiskrá til verkætlan, herundir hølistørv, teknisk krøv og orkukrøv
- Gera kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri bygging
- Gera rakstrarætlan, t.e. roknað meting um árligar rakstrarkostnaðir
- Gera uppskot til fígging, herundir møguleikar at fáa til vega fígging frá uttanhýsis pørtum

Serstaka nevndin fyri bygging av svimjihøll verður mannað við politiskum umboðum og umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Fíggjarnevndin setir nevndina, sum í minsta lagi 2. hvønn mánaða leggur statusfrágreiðing fyri mentamálanevndina og fíggjarnevndina, ið skal góðkenna arbeiðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at seta serstaka nevnd undir fíggjarnevndini at fyrireika nýggja svimjihøll við omanfyristandandi arbeiðssetningi og at velja Elin Lindenskov og Annfinn Brekkstein í nevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 23. mai 2016 samtykt byggiskrá fyri byggiverkætlanina. Byggiskráin er hjáløgd sum fylgiskjal 1 og svarar hon uppá settu spurningarnar og punktini.

Tó viðv. spurninginum um lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum, er at viðmerkja:

Tórshavnar kommuna hevur fylgjandi svimjihallir:
1). Svimjihøllin í Kollafjarðar skúla.
Verður brúkt bæði til skúlar og stovnar og er opin fyri almenninginum fleiri dagar um vikuna og alt skúlaárið. Høllin tænir einum lokalum endamáli burturav og er ikki upplagt at broyta nakað tí viðvíkjandi. Høllin er í góðum standi.

2). Svimjihøllin í eindini á Argjavegi hjá Skúlanum á Fløtum (gl. Argja Skúla). Verður brúkt burturav til skúlabrúks. Framtíðin er nógv tengd at, hvussu verður við eindini á Argjavegi tá Skúlin á Fløtum er

liðugur í 2020. Uppskotini, ið hava verið nevnd eru til annað kommunalt endamál, so sum innan eldraøkið og hevur Nám X eisini verið nevnt, tó so at í løtuni verður arbeitt út frá, at Nám X fer inn í Handilsskúlabygningin. Alt eftir hvat framtíðar endamálið verður, skal støða takast til, um hylurin framhaldandi skal verða í brúki, ella hølið verður brúkt til annað endamál. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin. Høllin er í góðum standi.

3). Svimjihøllin í Hesti. Verður vanliga brúkt summarmánaðirnar. Ikki nøkur ætlan fyribils um nakra broyting. Høllin er í hampiligum standi.

4). Svimjihøllin í Eysturskúlanum. Hylurin verður brúktur til skúlabrúks umframt til kvøldskúla og aðra undirvísing. Mælt verður til at halda fram við honum óbroytt. Er serliga áhugaverd til ymiskar sertørvir, umframt skúlabrúks. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin, ið annars er í góðum standi.

5). Svimjihøllin í Gundadali. Er nógv brúkt til alskyns endamál.

Undangóðkenning av ráðgevaratoymum
Umsitingin er í holt við at fyrireika undangóðkenning av ráðgevaratoymum til eina møguliga hugskotskapping, sum ætlandi fer í gongd um miðjan juni og gongur fram til oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja
byggiskránna og at beina málið í býráðið, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Sbrt. Býráðssamtykt 23. apríl 2015 er talan um eina serstaka nevnd, sum vísir til fíggjarnevndina. Av teirri orsøk verður viðgerðin av byggiskránni at byrja í fíggjarnevndini, sum so beinir málið víðari til aðrar nevndir, áðrenn endaliga viðgerð í fíggjarnevndini og hareftir býráðsviðgerð.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja byggiskránna og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni og beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri langhyl í Gundadal var útskrivað í august 2016, eftir at Tórshavnar býráð 16. juni 2016 hevði samtykt byggiskránna fyri langhyl í Gundadali.

Trý ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey eru:
- Toymið Ósbjørn Jacobsen Ark.
- Toymið SNA Ark.
- Toymið Árni Winther Ark.

23. november 2016 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og vóru tey latin navnloynt soleiðis, at dómsnevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

2. desember 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat uppskot skal vinna hugkappingina og fáa møguleika at innganga møguliga avtalu um projektering vm. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

Hetta mál er tengt at máli 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm., ið eisini er til viðgerðar í løtuni.

Á løgukonto 5775 L5610 eru umleið 7.000 tkr. tøkar til verkætlanina. Ætlanin er í næstum at fara undir nærri greiningar og samráðingar við vinnandi hugskotið og koma aftur til nevndarviðgerð við nærri greining av heildarkostnaði, tíðarætlan, útboðsleisti og fíggjarætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðari og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini um vinnandi hugskotið og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um møguliga projektering, umframt gerð av tíðarætlan, útboðsleisti, fíggjarætlan vm. og venda aftur til nevndina við einum uppskoti. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Mælt verður til at skipa bygginevnd í sambandi við nýggja langhylin samsvarandi vanligu mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur 2 limir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mælir býráðnum til at velja tveir limir í bygginevndina fyri nýggjum langhyli.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Bergun Kass og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2017 eru játtaðar 4.798 tkr. á konto 5775 mentan og frítíð.

Í fjør var hugskotskapping um verkætlanina, ið toymið við SNA ark. v.fl. vunnu. Sbrt. kappingartreytunum fingu tey bæði toymini sum luttóku, men ikki vunnu, 200 tkr. fyri luttøkuna.

Seinni í heyst kemur ætlandi til viðgerðar uppskot til sáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið um projektering av verkætlanini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 420 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti**
Serstaka nevndin fyri langhyl hevði fund 7. feb. 2018.

Soleiðis var ført í fundarfrásøgnina: "*3. Viðv. tíðarætlan og samráðingunum um projekteringssáttmála. Uppskot um projekteringssáttmála umleið 7 mió. kr. Tøkar eru umleið 4,5 mió. kr. í løgukarminum í 2017. Tað, sum er á karminum, er ikki flutt í 2018 enn. Hinvegin, hvat ið er tøkt, verður vantandi endaligt í mars 18. Stjórnin metir, at projektið eigur at vera forskotið, til fíggingin er tøk til samlaðu projekteringina og rúm er í íløguætlanini fyri byggikostnaðinum. Fundur hevur verið við SNA-toymið um at forskjóta projektið til ársskiftið 18/19. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina á einum komandi fundi. Fyribils meting hjá teknisku fyrisiting er, at projektering tekur umleið 1 ár (við fyrivarni) + útbjóðing 2-3 mánaðir.*

*Heðin Mortensen metir ikki, at projektið eigur at útsetast, tí 4,5 mió. kr. eru avsettar í 2017, og eiga at verða fluttar yvir í 2018. Við at avseta restfígging í 2019, verður komið á mál við projekteringini. Síðani avseta pening til bygging av svimjihøllini á íløguætlanini fyri komandi árini.*"

Fráboðað er Havnar Svimjifelag og Svimjisamband Føroya at projektering ætlandi verður planløgd at byrja um árskiftið 2018/19. Í sambandi við gerð av fíggjarætlan fyri 2019 verður ætlandi gjørt eitt uppskot til fíggingarætlan fyri projektering og bygging av langhyli. Vent verður aftur í nevndina við málinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við at projekteringin verður sett at byrja um ársskiftið 2018/19 og at fígging til projektering og bygging verður tikin upp í sambandi við fíggjarætlan 2019.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus, krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein seta fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til, at projekteringin av langhylinum fer í gongd beinanvegin, at 4,5 mió. kr., avsettar á fíggjarætlanini 2017, verða fluttar til fíggjarárið 2018, og at restfígging, umleið 2,5 mió. kr. at fíggja projekteringina, verður avsett í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið 2019.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Odd Færø, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Ímóti: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í mentamálanevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Heðin Mortensen.

Blankt atkvøddi: Odd Færø.

**Ískoyti**
Á løgukarminum 5775 mentan og frítíð fyri 2018 eru framfluttar 5.029 tkr. Umsitingin er í holt við at samráðast um ráðgevarasáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið og kemur ætlandi í nevnd við málinum í oktober/november 2018 soleiðis at projekteringin kann byrja í desember 2018/januar 2019. Tørvur er at hava tøkan pening á projektkontuni í sambandi við samráðingarnar v.m., ið er í gongd í løtuni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 5.029 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen og Turið Horn vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

**UPPSKOT Í GERÐ!!!!!**

Serstaka nevndin (bygginevndin) fyri gerð av langhyli, hevur á fundi 16, 20 og 2x. november 2018 samtykt at taka undir við samráðingarúrslitinum frá samráðingunum um ráðgevarasáttmála við vinnandi SNA samtakið, ið fevnir um SNA umframt LBF og SMJ. Bygginevndin mælir til at høllin og hylurin verða breiðkað nakað, umframt at støða verður tikin til um verkætlanin eisini skal fevna um 2 terapihyljar.

Fylgjandi viðurskifti eru at viðgera nærri í sambandi við ráðgevarasáttmálan:

## I. Støðd á langhylinum

Í sambandi við tilgongdina at gera ráðgevarasáttmála var 10. oktober 2018 fundur millum umsitingina, umboð fyri Svimjisambandið og Havnar Svimjifelag við Joaquin Pujol, formann í FINA (altjóða svimjisambandinum) Facilities Committtee um verkætlanina. Sí hjálagt fundarfrásøgn frá fundinum og niðurstøður.

Eftirfylgjandi hevur umsitingin fingið afturmelding frá Joaquin Pujol um, at frásøgnin er rættvísandi, og avtalað er, at tá nýtt skipanaruppskot er tøkt, ætlandi í fyrsta ársfjórðingi 2019, verða nýggj frágreiðing og tekningar sendar FINA til viðmerkingar, har støða er tikin til ymisku viðurskiftini, sum vórðu viðgjørd á fundinum í okt. 2018. Herundir sonevnt flow í høllini í sambandi við kappingar, um pláss til áskoðarar, miðlar, VIP etc. og um karmar til sjónvarp, lýsingar o.a.

Við støði í samskiftinum við FINA hevur bygginevndin viðgjørt, hvørt tað er hóskandi at breiðka hylin og høllina nakað. Semja er um, at tað er mest hóskandi at hava 10 geilar á 2,5 m. hvør, í staðin fyri 8 geilar á 2,5 m. umframt 0,5 m. skvatligeil í hvørjari síðu. Við hesi broyting verður hylurin betri egnaður til kappingar, umframt at hann fær enn betri nyttuvirði í mun til dagligu og fjølbroyttu nýtsluna hesi komandi 3-4 áratíggjuni. Vansin við hesi broyting er, at hylurin gerst størri, og harvið eisini vatnnøgdin, ið skal hitast og viðgerast størri, umframt at høllin gerst tilsvarandi breiðari. Nevndin er samd um at longdin framhaldandi verður 50 m., umframt 1 m. afturat til eina flytiliga brúgv, so til ber at býta hylin uppá ymiskan hátt bæði til 25 m. langar geilar og samansett 25 m./50 m. langar geilar.

Annað týðandi høvuðsmál er, at høllin má gerast nakað breiðri enn í verandi støðu. Hetta serliga við atliti til at kunna seta upp fyribils áskoðarapláss (rúma fleiri áskoðarum til serligar kappingar), pláss til officials, sjónvarping, lýsingar o.a. Í tí dagliga kann øki brúkast til venjingar, upphiting, avseting o.a. Samanlagt verður høllin breiðkað til umleið 46 m. Á hjáløgdu mynd sæst, hvussu bygningurin fyllir byggiøkið í plan. Kostnaðurin av hesi broyting er í lýstur í skjali x.

## II. Nýggjur innandura smábarnahylur/terapihylur og uttandura terapihylur

Í kappingaruppskotinum, ið vann, var á tekningunum lýst ein loysn við uttandura terapihyli, umframt einum serligum heitvatns-terapihyli innandura í millumøkinum millum bygningarnar. Hesin er serliga hugsaður til smærri børn, umframt til onnur, ið ynskja møguleikan at vera í einum serliga heitum hyli við terapi og vælveru í huga. Hugsanin er, at rúmið skal vera lutfalsliga lágt og tætt, soleiðis at tað er lættari at halda ein høgan hita. Meirkostnaðurin av uttandura terapihylinum og innandura terapihylinum eru lýstir í skjali x.

Bygginevndin metir at gerð av hesum báðum ískoytisverkætlanum er áhugaverd í sambandi við at umgera Svimjihøllina til ein vatndepil við vælveru, rørslu og kappingum.

III. Fleiri brúsur og skiftirúmsviðurskifti

Í byggiskránni er viðgjørt viðv. táverandi heitvatnsskipan til brúsurnar og tørv á fleiri brúsum.

Í 2017 bleiv heitvatnsskipanin til brúsurnar endurnýggjað. Í 2019 er ætlanin at greina møguleikarnar fyri útbyggingum við fleiri brúsum (óheft av langhylsverkætlanini). Miðrúmini í skiftingarrúmunum, har tað áður vóru sólir, kunnu umgerast soleiðis, at har ber til at gera fleiri brúsur. Í 2018 eru skápini í skiftingarrúmunum endurnýggjaði, og ber lutfalsliga lætt til at økja um talið av skápum. Eisini eru viðurskiftini hjá fólki, ið bera brek, og sum hava tørv hjálp til skifting o.a. tørv á at gerast betri í verandi høll. Hetta verður eisini tikið upp í 2019.

## III. Ráðgevarasáttmálin og kostnaður

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum. Samlaða upphæddin fyri projektering er ásett til tkr. 11.500. Í hjálagda skjali er greining mettu av kostnaðarviðurskiftunum fyri verkætlanina við teimum ymisku valmøguleikunum.

Verður avgjørt at verkætlanini eisini skal geva um báðar terapihyljarnar hækkar kostnaðurin fyri projektering til tkr. 12.400.

Umframt sáttmála við SNA-samtakið, er ætlanin at hava tilknýttar 2 byggiharraráðgevar t.e. Sp/f Ráð til almenna byggiharraráðgeving og byggileiðslu í sambandi við bygginginа, umframt DTI til ráðgeving og eftirlit í sambandi við hylja- og vatntøkniveiting. Hædd er tikin fyri hesum í kostnaðarmetingini.

Á løgukontu L57015 Svimjihøll eru umleið 4,9 mio.kr. tøkar til projektering o.a. Tørvur er á umleið 4 mio.kr. afturat í 2019 til projektering.

Sbrt. tíðarætlanini byrjar projektering í desember 2018 og gongur fram til á várið 2020. Hareftir skal støða takast til útbjóðing og er hugsandi at byggingin kann byrja í august 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja:

a). at hylurin og høllin verða breiðkað

b). og mæla nevndini til at ráðgevarasáttmálin fevnir um projektering av uttandura heitvatnshyli og innandura heittvatns/terapihyli, og við teimum tillagingum at innganga ráðgevarasáttmála við SNA-samtakið um projektering av langhyli. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Neyva sáttmálaupphæddin fyri ráðgevarasáttmálan (sbrt. samtykt í mentamálanevndini og fíggjarnevndini) er kr. 12.346.671.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Projektering av langhylsverkætlanini er í gongd. Til verkætlanina í ár eru 4.136 tkr. ætlaðar av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg í 2019. Saman við framflyting á projektkontuni verða umleið 8.705 tkr. tøkar til verkætlanina í ár og verður tað mett hóskandi í mun til løgdu ætlan fyri projektering v.m.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at flyta 4.136 tkr av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg á projektkontu L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundinum koma umboð fyri bygginevnd og ráðgeva at leggja fram nýggjasta skipanaruppskotið, kostnaðarmetingar o.a. Bygginevndin er í fer við at leggja seinasta hond á viðgerðina og er endaligt tilmæli ávegis.

Sí hjálagt skjal við skipanaruppskotinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórnin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða framløguna.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Umrøtt.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 24. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Bygginevndin (Serstaka nevndin fyri at fyrireika nýggjan svimjihyl) hevur á fundi 28. juni 2019 samtykt hjálagda skipanaruppskot. Tó so at bygginevndin ynskir at ráðgevin í víðari tilgongdini kemur við eini nøktandi takloysn, umframt kemur við uppskotum til møguligar sparingar og hvussu bygningurin kann fáa ein enn betri orkuprofil. Í mun til viðgerðina seinast, er uppskotið rættað til við støði í samtyktunum í málinum í nov-des. 2018. Harumframt hevur ráðgevin saman við bygginevndini gjøgnumgingið málið við eini longri røð av áhugapørtum innan svimjing t.e. skúlar, dagstovnar, feløg, sersamband, KVF etc. og rættað ymiskt til. Sbrt. galdandi mannagongdum skal skipanaruppskot í byggiverkætlanum góðkennast í avvarðandi nevnd, fíggjarnevnd og býráði.

Eisini er uppskotið viðgjørt við altjóða svimjisambandið FINA saman Svimjisambandi Føroya – sí hjálagt teirra metingar. Bygginevndin metir, at verkætlanin er slóðbrótandi og kann vera ein framtíðartryggjaður karmur um alskyns svimjivirksemi langt fram í tíðina og eisini gera tað møguligt at bjóða seg fram til eina røð av fleirlanda svimjikappingum.

Við støði í skipanaruppskotinum er gjørd kostnaðarmeting, sí hjálagt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja hjálagda skipanaruppskot og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Byggiskráin fyri langhylin fevnir ikki um at víðka um skiftirúms- og brúsuviðurskiftini. Skipanaruupskotið leggur upp, at øll almenn atkomu- og skiftirúmsviðurskifti framhaldandi verða í verandi høll.

Sum upplýst í málinum til býráðsviðgerðina í desember 2018 viðvíkjandi ráðgevarasáttmálanum, fer nýggja høllin at hava økt virksemi og økt tal av brúkarum við sær.

Metast má týðandi eisini við atliti at víðari prosjekteringini, at fingið verður til vega uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, og sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum. Útreiðslur til hesa bygging liggur uttanfyri kostnaðarmetingina fyri langhylin annars.

Til tess at fáa uppskot til vega skal roknast við ávísum útreiðslum til ráðgeving v.m. Mælt verður til at geva umsitingini heimild til at biðja um tilboð hesum viðvíkjandi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at fáa til vega ítøkiligt uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum, og at umsitingin fær heimild til at biðja um tilboð til ráðgeving hesum viðvíkjandi.

**Mentamálanevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at samtykkja skipanaruppskotið og tilmælinum um at fáa til vega uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu, og at umsitingin fær heimild at biðja um tilboð til ráðgeving hesum viðvíkjandi. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Projekteringin av langhylsverkætlanini er nú komin væl áleiðis og verður væntandi liðug í mai 2020 og kemur málið um góðkenning av høvuðsprojektinum, umframt útbjóðing til støðutakan í nevndum og býráð.

Til verkætlanina í ár eru 4.000 tkr. ætlaðar av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg í 2019. Harumframt verður væntandi í apríl 2020 ein framflyting av tøkari játtan á projektkontuni frá 2019. Upphæddin er ikki endalig tøk enn, men fer í høvuðsheitum til at gera projekteringina lidna. Játtanin í 2020 fer ætlandi til at kunna byrja útinningina av verkætlanini í heyst t.e. í høvuðsheitum talan um burturbeining av ÍSF-húsinum, rigga byggipláss til og byrjan uppá jørð- og lendisarbeiðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at flyta 4.000 tkr av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg á projektkontu L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2020**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

# 78/20 Tórshavnar býarsavn: Ásetan av atgongumerkjaprísum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.04.2020 | 113/20 | 20/01119-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 101/20 | 20/01119-3 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 78/20 | 20/01119-3 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar býarsavn.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í mai/juni letur ætlandi upp framsýningin Havnin undir krígnum,ið Tórshavnar býarsavn stendur fyri.

Savnið metir at tað er hóskandi at taka eitt atgongumerkjagjald á 50 kr. (tó børn undir 14 ár og yngri ókeypis). Roknað verður við 2000 rindandi vitjandi, umframt sama tal av børnum og ungum.

Stovnurin kann harumframt taka serligt gjald (kostnaðargrundað) fyri rundsýningar og søguliga gongutúrar, ið ætlanin er at skipa fyri í samstarvi við Kunningarstovuna/Visit Tórshavn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki beinleiðis ásetingar í lógini um bygdasøvn um hesi viðurskifti.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál 19/05010 Serframsýning: Havnin undir krígnum.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ikki viðkomandi

**Umhvørvisárin**
Býarsavnsvirksemi hevur avmarkað umhvørvisárin.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at Tórshavnar býarsavn kann taka 50.kr. í atgongumerkjagjaldi fyri persónar 15 ár og eldri. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2020**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðð.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

# 79/20 Venjingarhøli í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 92/19 | 19/00423-2 |
| 10 Fíggjarnevndin | 06.04.2020 | 85/20 | 19/00423-2 |
| 11 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 57/20 | 19/00423-2 |
| 12 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 79/20 | 19/00423-2 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 01.10.2019 | 2/19 | 19/00423-2 |
| 3 Økisnevndin | 18.03.2019 | 6/19 | 19/00423-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 147/19 | 19/00423-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 7/20 | 19/00423-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 68/20 | 19/00423-2 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 70/20 | 19/00423-2 |
| 8 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 21/20 | 19/00423-2 |
| 9 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 91/20 | 19/00423-2 |

**Upprunin til málið:**
Jákup Dam, býráðslimur.

**Samandráttur:**
Uppskotið snýr seg um at fáa bygt ein minni hjábygning afturat høllini upp á høvuðsinngongdina norðanfyri til at seta upp venjingarmaskinur av ymsum slag til brúk innan ítróttin v.m.

**Lýsing av málinum:**
Sbrt. uppskotinum er hugsanin í fyrsta umfari at fáa planerað, stoypt og takt ein rábygning á umleið 100 m2, ið skal staðsetast uppat verandi hallarbygningi. Síðani er hugsanin, at húsavørður hjá Ítróttaanleggum stigvíst fer undir innrætting av hølinum til venjingarendamál. Harumframt koma fakveitingar innan el- og hvs. Fyribils verður mett, at kostnaðurin fyri tað, sum skal bíleggjast av uttanhýsis veitingum ella tilfari, verður umleið 800 tkr.

Ítróttaanlegg og umsitingin meta, at onnur alternativ eiga at verða umhugsað viðv. umstøðum til venjingarútgerð. Uppat høllini er fimleikahøllin í Kollafjarðar skúla.

Mett verður, at tað ikki er alneyðugt, at skúlin bæði hevur ítróttahøll og fimleikahøll fult út til taks. Ein loysn við venjingarútgerð í parti av fimleikahøllini kundi eisini verið umhugsað, ið haraftrat má metast bíligari loysn.

Tað hevði so gjørt, at skúlin o.o. framhaldandi kundu brúkt fimleikahøllina partvíst til ymisk serstøk høvi, samstundis sum tað ikki verður neyðugt at gera íløgu í uppíbygging av ítróttarhøllini. Á 1. hædd í høllini við inngongdina er eisini ein stór loftshædd. Henda kundi eisini verið innrættað, men mett verður, at tann verkætlanin kostar nakrar mió. kr. vegna brunakrøv, trappuviðurskifti, lyftu v.m.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í Tórshavnar kommunu eru privatar venjingarmiðstøðir, sum heild eigur at vera sýnt ansi viðv. kappingaravlaging.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

Eingi.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ikki viðkomandi.

**Umhvørvisárin**
Ávís.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Tekning av uppskotinum viðv. útbygging av ítróttahøllini.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at arbeiða víðari við ætlan, har partur av fimleikahøll skúlans verður gjørd til venjingarhøli.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við at byggja ein tilbygning aftrat ítróttarhøllini og beina málið í staðbundnu nevndina fyri Kollafjørð og økisnevndina.

**Økisnevndin 18. mars 2019:** Samtykt at játta ein part av íløguni kr. 400.000,-, vísandi til raðfestingarlistan sum er gjørdur yvir bygdirnar mál. nr 19/01034. Bergun Kass var ikki við til hetta málið.

**Ískoyti**
Nú er greitt at Økisnevndin játtar 400 tkr. til verkætlanina, umframt tær 300 tkr. sum eru settar av á kontuni fyri smærri ítróttaanlegg. Tá ávís fígging nú er tøk, er tíðin búgvin til næsta stig, ið er at fáa innheintað tilboð uppá gerð av innlokaðum hjábygningi. Hugsanin er at fáa ráðgeva Ove Mortensen, arktitekt at gera skitsuuppskot, ið verður latið til byggivaldið til góðkenningar. Síðani verður farið undir at bjóða arbeiðið viðv. gerð av innilokaðum hjábygningi út sum undirhondsboð til tveir veitarar. Væntandi tekur tilgongdin at gera skitsuprojekt og at fáa innheintað tilboð til og við mai 2019. Ætlanin er at hetta verkætlanarstigið skal kunnu fremjast fyri í mesta lagi 700 tkr.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini at fáa gjørt avtalu um skitsuprojekt við Ove Mortensen, ark. og søkja um myndugleikagóðkenning.

b). at bjóða arbeiðið at gera innilokaðan hjábygning út til tveir veitarar sum undirhondsboð.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 01. oktober 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Í høllini er loft, sum ikki er gjørt liðugt, og sum kundi verið innrættað til m.a. venjingarhøli og felagshøli annars. Í fyrireikingararbeiðnum hevur tekniska fyrisiting víst á tað óhepna, at nýggjur hølistørvur verður loystur við at byggja høllina út, heldur enn at gera loftið liðugt og útvega ta meirfígging, ið krevst.

Ymsar ætlanir hava verið um at innrætta loftið. Avbjóðingin er fyrst og fremst kostnaður til brunaviðurskifti og atkomu við lyft. Trivnaðarfyrisitingin metir, at loysnir hesum viðvíikjandi eiga at kannast nærri, so at til ber at viðgera innrætting av loftinum sum loysn til venjingarhølið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um umsitingin skal fyrireika aðra hølisloysn enn samtykt 8. mai 2019.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Samtykt at halda fast við samtyktina frá 8. mai 2019.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var viðgjørt seinast, hevur Jákup Dam, býráðslimur, biðið um frágreiðing, hvørt tað samanlagt er ein fyrimunur heldur at gera eina loysn inni í verandi hølum á Loftinum, heldur enn at byggja afturat høllini sum annars samtykt.

Umsitingin metir, at ein loysn kann gerast fyri umleið 2.200 tkr. og fevnir tá um innrættan av allari hæddini, tó ikki íroknað lyftu millum hæddirnar. Undantak kann væntandi fáast fyri lyftu í upp til 3 ár.

Sí hjálagt skitsur viðv. innrætting av verkætlan á Loftinum í Høllini.

Ein avbjóðing er at fáa gólvið so mikið stoytdoyvandi, at venjingar við tungum vektum ikki larma óneyðugt og gera stoytskaðar á elskipan v.m. Neyðug atlit verða tikin í tí sambandi í gólvloysnini.

Í løtuni eru 700 tkr. tøkar til endamálið á projektkontu L57029F Venjingarhøli í Kollafirði.
Til at fíggja restina av tørvinum verður í apríl 2020 gjørt tilmæli í sambandi við framflytingar frá fíggjarárinum 2019 í fíggjarætlanini, har restfíggingin kr. 1,5 mió. verður játtað inn á kontu 6110 Umsiting og røkt av bygningum, soleiðis at tað í alt verða 2.200 tkr. Tá er eisini nærri greitt sáttmálaupphædd í høvuðsarbeiðstøkuni.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla mentamálanevndini og byggi- og býarskipanarnevndini til at samtykkja:
a) at gera venjingarhøli á loftinum í høllini og heimila umsitingini at gera avtalu um projektering við Ove Mortensen, ark. og søkja um myndugleikagóðkenning,
b) at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð og høvuðsarbeiðstøka,
c) at flyta 700 tkr. av projektkonto L57029F Venjingarhøli í Kollafirði til kontu 6110 Umsiting og røkt av bygningum - oyramerkt til hesa verkætlan, og
d) at restupphæddin 1.500 tkr. verður játtað í viðgerðini av framflytingum av játtanum frá 2019 til kontu 6110 Umsiting og røkt av bygningum ætlað hesi verkætlan.

Málið verður beint í býráðið um teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men biðja umsitingina koma aftur í nevnd við tilmæli viðvíkjandi kostnaði og fígging til gerð av lyft.

**Ískoyti**:
Viðv. kostnaðarmeting fyri lyftu
Umsitingin hevur kannað nærri viðv. kostnaðinum fyri at fáa lyft gjørda.
Mett verður at lyft til 6 persónar, stálkonstruktión kring lyft, brunaverja við lættstáli og gips, GSM moduli og góðkenning hjá Arbeiðseftirlitinum kann útvegast fyri umleið 600 tkr. íroknað kommunalt MVG.

Fígging er ikki tøk til endamálið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til um lyft skal útvegast til verkætlanina í hesum umfari.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd 10. mars 2020.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at fara undir verkætlanina, so sum lýst í tilmælinum, og at arbeitt verður við at fáa fígging til lyft sum skjótast.

**Ískoytið fígging nágreinað:**
Samlaða arbeiðið verður mett at kosta umleið 2,2 mió. kr.. Hetta verður fíggjað við 700 tkr. av projektkonto L 57029 Venjingarhøli í Kollafirði aðrari konto og 1,5 mió kr. av konto 6811 Áir, yvirflatuvatn og veitir frá 2019 (avlop 2019).

**Fíggjarnevndin 06. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 80/20 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu: Støðan og framtíðar løgutørvur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 324/19 | 19/04413-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 29.04.2020 | 110/20 | 19/04413-1 |
| 11 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 80/20 | 19/04413-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 9/20 | 19/04413-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 21.01.2020 | 33/20 | 19/04413-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 12/20 | 19/04413-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 10/20 | 19/04413-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 73/20 | 19/04413-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 78/20 | 19/04413-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 27.04.2020 | 123/20 | 19/04413-1 |
| 9 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 55/20 | 19/04413-1 |

**Upprunin til málið:**
Umsitingin.

**Samandráttur**
TK hevur 5 fótbóltsvallir í fullari stødd, umframt Eysturvøll og tilhoyrandi stadion kring leikvallirnar. Talan er um stór og týðandi anlegg, ið hýsa umfatandi virksemi gjøgnum stóran part av árinum, men eisini anlegg, ið tørva regluligar dagføringar v.m. Í málinum verður gjørd eina støðulýsing, umframt givið eitt boð uppá framtíðar løgutørv.

**Lýsing av málinum**

Alment
Metingarnar í hesum yvirlitinum eru í høvuðsheitum grundaðar á metingar hjá umsitingini og Ítróttaanleggum. Talan er um yvirskipaðar metingar, sum skulu takast við ávísum fyrivarni, men sum geva eina rímiliga greiða ábending. Í hvørjum einstaka føri vil ítøkilga tilgongdin geva eitt endaligt svar uppá kostnaðir v.m.

**Viðv. tørvi á at skifta graslíki:**

- Ovari vøllur í Gundadali
Seinasta vallarkanningin í sambandi við UEFA-dystir var gjørd á várið 2019 og fekk vøllurin aftur góðkenning. Sí hjálagt skjal. Vøllurin er enn í rímiligum standi, men verður neyðugt at fyrireika eina møguliga útskifting innan stutta tíð. Ítróttaanlegg leggur seg eftir at halda vøllirnar væl og hevur m.a. júst í summar lagt á meiri gummigranulat. Vøllurin verður kannaður árliga. Málið er at vøllurin heldur minst til á sumri 2021 og skiftast á sumri 2021. Feløgini í Gundadali mæla hinvegin til at skifta vøllin í 2020, og at sprinkling eigur at verða løgd undir vøllin. Vøllurin er næsttýdningarmikli fótbóltvøllurin hjá TK.  og verður mett at útskifting av vøllinum er mett til umleið 3.300 tkr., við sprinkling nærri 5.000. tkr

- Niðari vøllur
Vøllurin er nógv skalaður í sambandi við Vesturskýlisverkætlanina á Tórsvølli. Verkætlanin er væntandi farin av vøllinum á heystið 2020 og verður mælt til at gera økið í stand aftur og skifta vøllin á várið 2021, enn er tó óvist viðv. skaðum og lendisarbeiði. Saman við neyðugum lendisarbeiði verður samlaði kostnaðurin mettur til uml. 5.000-5.500 tkr.

- Vøllurin Inni í Vika/Argir
Vøllurin er tann elsti – umleið 10 ár og stendur fyri útskifting. Ítróttaanlegg leggur seg eftir at halda vøllirnar væl og hevur m.a. júst lagt á meiri gummigranulat, men er tað uppá lánta tíð. Málið er at vøllurin heldur minst til og við 2021 og skal í seinasta lagi skiftast á várið/sumri 2022. Útskifting av vøllinum er mett til umleið 3.000 tkr.

- Tórsvøllur
Seinasta vallarkanningin var gjørd á várið 2019. Sí hjálagt skjal. Ítróttaanlegg leggur seg eftir at halda vøllirnar væl og hevur m.a. júst lagt á meiri gummigranulat. Vøllurin verður kannaður árliga. Málið er at vøllurin heldur minst til og við 2020, og sostatt ikki skiftast fyrrenn á vári/sumri 2021. Hinvegin ætlar FSF at skifta vøllin í 2020 í sambandi við, at FSF er vertur fyri EM-endaspæli fyri U17 í apríl/mai 2020. Vøllurin er týdningarmiklasti fótbóltvøllurin í TK og verður mett, at útskifting av vøllinum, flyting og umskipan av sprinklaraskipan (7 pkt. til 12. pkt.) o.a. verður mett til umleið 5.000 tkr. FSF hevur sagt seg vera sinnað at rinda 50% av kostnaðinum.

- Eysturvøllur
Vøllurin er sum heild í góðum standi og er ætlanin at hann skal halda nøkur ár afturat.

- Hoyvíksvøllur
Vøllurin er í góðum standi. Tað ganga fleiri ár áðrenn tørvur aftur er á útskifting.

**Viðv. krøvum frá FSF til ljósskipanir við vallirnar**:

Alment
Vallarreglugerðin hjá FSF setur krav um 250 lux til dystir í fremstu og næstfremstu deild, tó um gjørd verður skipan við 350 lux fæst 400 tkr. (við fyrivarni!) í stuðli frá FSF/Hattrick-grunninum. Í tann mun feløgini ikki uppfylla treytirnar skulu tey vísa á ein tiltaksvøll tá tørvur er á tí. Her vísir kommunan á Tórsvøll.

- Ovari vøllur
Ljósstyrkin pt. er umleið 80 lux. Skal vøllurin uppfylla vallarreglugerðina er ábending um, at bæði fundament og mastrar skulu skiftast umframt lutvíst nýggjar el-talvur, kábling og + nýggir projektørar. Kostnaðurin er helst umleið 5 mio.kr, tá roknað við LED-tøkni.

- Argir
Styrkin pt. er nøkur tíggju lux og uppfyllir ikki vallarreglugerðina. Helst mugu fundament, mastrar, elskipan og projektørar gerast av nýggjum. Kostnaðurin er helst umleið 5 mio.kr, tá roknað við LED-tøkni.

- Niðari vøllur
Er framyvir mest ein venjingarvøllur og ikki til dystir í fremstu og næstfremstu deild. Í sambandi við Tórsvallaverkætlanina verða mastrar og ljós skift á eystaru síðu og kostar tað nakrar fáar hundrað túsund. Vestara síða er eisini um at verða útlivað og kostar helst minst eini 1.500 tkr. at dagføra.

- Hoyvíksvøllur
Ljósskipanin er nýggj og ca. 250 lux og tekur seg væl út og tykist hava lítlan ampa fyri grannalag. Uppfyllir vallarreglugerðina hjá FSF. Ongin orsøk sum er til broyting ella stórvegis íløgur.

- Eysturvøllur
Tað verður ikki mett neyðugt við nøkrum serstøkum átaki.

**Umstøður kring station**

- Ovari vøllur í Gundadali

Í sambandi við skifting av graslíkinum er tørvur á at gera nýggja girðing, umframt aðrar ábøtur á vestaraskýli o.a.

- Niðari vøllur
Í sambandi við upprætting av undirlagnum og nýggjum graslíki skal eisini nýggj girðing gerast, umframt finna eina góða loysn fyri økið móti ovara vølli.

- Vøllurin Inni í Vika/Argir
Tørvur á at gera ymiskar ábøtur, herundir betri p-viðurskifti, snøgga kring stadion v.m.

- Tórsvøllur
Er partur av øðrum máli. Stig 8 í avtaluni við FSF um økið har bygningarnir við niðara vøll standa – er næst á skrá.

- Eysturvøllur
Ynskiligt at fingið gjørt fleiri p-pláss norðanfyri stadion.

- Hoyvíksvøllur
Tørvur er á eini røð av hentleikum. Station hevur undantak frá reglunum í Vallarreglugerðini. Talan er um mio.kr. tørv. Av kringumstøðunum kunnu nevnast tørv á at tryggja skráningin norðanfyri móti Skúlanum við Løgmannabreyt, at gera áskoðarapláss, felagshús til skifting v.m. Umframt átroðkandi tørv á at gera hægri girðing sunnanfyri vøllin móti Jørundargøtu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ikki viðkomandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongi.

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Graslíkisvallir hava við sær umhvørvisárin herundir serliga dálking frá gummigranulati o.a. Umsitingin og Ítróttaanlegg leggur seg eftir at loysnir og røkt eru so frægar sum gjørligt.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin kemur við einari endaligari tilráðing um raðfestingar og tíðarætlan til ein komandi fundi

**Mentamálanevndin 27. November 2019:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Eftir viðgerðina seinast er fíggjarætlanin fyri 2020 samtykt, umframt at tað í langtíðar-íløguætlanini er lagt upp til fígging til áhaldandi dagføringar 2021 og 2022.

Á løgukontu 5775 eru fyri fíggjarárið 2020 játtaðar 5.000 tkr. til Gundadal/Argir (vallarøkið) og ætlaðar 4.000 tkr. til 2021 og 3.000 tkr. 2022, umframt ætlaðar 7.000 tkr. í 2021 til ljós til vøllir í Gundadali og á Argjum.

**Sjónarmið hjá HB og B36**
Umsitingin hevur havt fund við HB og B36 um raðfestingar av tøka løgukarminum fyri 2020 og hugsanir um ár 2021 og framyvir og umrøddu, um feløgini mettu, at ljósskipan ella graslíki skuldi koma fyrst í raðfestingunum fyri 2020. Hetta tí tað ikki er fíggjarliga møguligt at fremja báðar verkætlanirnar í 2020 fult út innan fyri givna fíggjarkarmin. Teirra einmælta tilmæli er, at TK skiftir graslíki á ovara vølli á sumri 2020 og um møguligt eisini at fáa sprinklaraskipan til vøllin ella at gera fyrireikingar til tað.

Við støði í galdandi samtyktu fíggjarætlan fyri 2020 og teimum teimum fíggjarligu útlitunum, umframt tilmælinum frá HB og B36, umframt dialogi við FSF, verður mett, at fylgjandi raðfesting er eitt boð upp á raðfestingar í 2020, 21 og 22. Henda raðfesting er tó ikki meiri føst enn at hon kann endurskoðast, so hvørt orsøkir eru til tess.

**Ráðgeving í sambandi við verkætlanirnar**
Gerast skulu avtalur um ráðgeving um graslíkisvøllin. Hartil kemur spurningurin um sprinkling. Verður avgjørt at fara undir fyrireikingar til at gera spinklaraskipan til ovara vøll, er eisini upplagt hava í huga framtíðar tørvin at leggja rør til útskifting av el-kaðalum til komandi nýggju ljósskipanina.

Arbeiðið uppá nýggja Vesturskýlið á Tórsvølli gongur sína gongd og herundir liðugtgerð av horninum móti B36 húsinum. Ein komandi nýggj ljósmastur til ovara vøll skal sannlíkt setast har á leið, og er tí upplagt at fáa gjørt eitt mastrafundament til hana longu nú í 2020, so tað ikki verður neyðugt at fara afturumaftur í 2021, tá ljósskipan annars ætlandi skal gerast við Ovara vøll.

Sostatt er greitt, at talan er um eina samanseting av fleiri ráðgevaraøkjum t.v.s. innan lendis- og graslíkisviðurskifti, innan sprinklaraskipan (HVS) og innan konstruktión og el hvat viðvíkur mastrafundamenti til nýggja ljósmastur við B36 húsið/Tórsvøll.

Um tað skal bera á mál, serliga við at skifta graslíki á sumri 2020, er neyðugt at fáa gjørt avtalur við ráðgevast sum skjótast og fáa boðið arbeiðini út.

Hvat viðv. gerð av mastrafundamenti við B36-húsið verður mett mest hóskandi at geva ráðgevunum, ið eru á teirri verkætlanini, møguleika fyri at gera ískoytisavtalu um tað, umframt at geva høvuðsarbeiðstakaranum har høvi at gera avtalu um gerð av arbeiðinum. Hetta tí at tað vanliga vil vera óneyðuga tvørligt at fáa aðrar ráðgevar og arbeiðstakarar inn um entreprisumark, har aðrir longu virka.

**Máltalva/stórskermur**
Verandi stórskermur er ikki í nøktandi standi til at tað er ráðiligt at brúka hann til komandi kappingarár, ið byrjar í mars 2020. Tí er átroðkandi sum skjótast at fara undir at útvega ein nýggjan. Umsitingin hevur kannað, um tað hevði borið til at leigað ella langtíðarleigað ein slíkar stórskerm í staðin fyri at keypa hann. Fyrimunurin við at leiga er minni tekniskur váði og skjótari útskifting, ið vanliga vildi verið 5. hvørt ár. Mettur kostnaður fyri ein slíkan skerm er upplýstur í hjálagda fylgiskjali.

**Meting um hvat letur seg fremja innan fyri setta fíggjarkarmin**
Vegna atlit til marknaðar- og kappingarviðurskifti eru mettar upphæddir o.a. lagdar í hjálagda fylgiskjali.

**Tórsvøllur stadion**
Tórsvøllur, sum tjóðarleikvøllur Føroya, er mentur og bygdur stigvíst í tøttum samstarvi millum FSF og TK. Sí hjálagt avrit av galdandi sáttmálum millum FSF og TK og sí eisini mál 16/00962 Tórsvøllur - vestursíðan. Arbeitt verður við at gera endaligu rakstraravtaluna fyri Tórsvøll lidna til nevndarviðgerð í vár.

Vísandi til seinastu vallarkanningina av Tórsvølli, og av tí at FSF er vertur fyri HM endaspæli fyri U17 kvinnur í mai-juni 2021, ynskir FSF at skifta graslíki á Tórsvølli í 2020. Eisini ynskir FSF at fáa gjørt fleiri sprinklaradysur og fáa flutt verandi sprinklaradysur á vøllinum soleiðis, at tær eru nærri leikvallarøkinum. Í dag eru dysurnar staðsettar soleiðis, at tær ofta koma at standa innan fyri talgildu ljósbandareklamurnar og tí ikki kunnu virka sbrt. endamálinum.

FSF er til reiðar at leggja út fyri verkætlanina, treytað av at FSF og TK gera eina avtalu um, at TK rindar sín part av verkætlanini við seinni høvi. Fyribils metingin av verkætlanini er upplýst í hjálagda fylgiskjali og tá gingið út frá, at lagt verður upp til at útvega allarbestu dygd av graslíkisteppi og gummigranulati. Harumframt er ætlanin at leiga ein nýggjan stórskíggja til stadion.

Eisini er lagt upp til at fáa sett ein fjarhitavekslara til hitaskipanina í vøllinum og soleiðis fáa eina eyka trygd fyri, at týðandi landsdystir kunnu verða spældir størri part av árinum. Ætlanin er at kanna, um sami vekslari kann veita hita til Fimi, B36-húsið og HB-húsið. Mettur kostnaður er upplýstur í hjálagda fylgiskjali.

Samstundis er eisini ynskiligt at kunna bjóða út veitingina av graslíki av báðum verkætlanunum í senn og soleiðis vónandi kunna spara nakað.

**Viðv. fyribils raðfestingum fyri 2021 og 22**
<u>2021</u>
Endurskapan av lendinum og skifting av graslíki við niðara vøll í Gundadali, umframt at gera nýggja ljósskipan til ovara vøll.

<u>2022</u>
Skifta graslíki á Argjum og at fáa nýggja ljósskipan har.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini at fara í samráðingar við FSF um at gera samstarvsavtalu um at skifta graslíki, flyta sprinklaraskipanina á Tórsvølli í 2020, umframt verkætlan við hitavekslara, og at TK rindar sín part í 2021 og 2022 og at venda aftur við eini avtalu til støðutakan.

b). at heimila umsitingini at heinta tilboð og fara í samráðingar við ráðgevar innan viðkomandi fakøki til at fremja pkt. a. og at venda aftur í nevndina við einum úrsliti til støðutakan.

c). at heimila umsitingini at heinta tilboð og fara í samráðingar við ráðgevar innan viðkomandi fakøki til at skifta graslíki á ovara vølli í Gundadali á sumri 2020, umframt gera fyrireikingar til at gera sprinklaraskipan á vøllinum og at venda aftur í nevndina við einum sáttmála til støðutakan.

d). at heimila umsitingini at samráðast við ráðgevar á Tórsvallar-vesturskýlisverkætlanini (t.e. Sp/f MAP, Sp/f HMP Consult og P/F LBF) um at gera eitt mastrafundament í horninum millum B36-húsið og Tórsvøll til eina komandi nýggja ljósskipan við ovara vøll og venda aftur í nevndina við einum sáttmála til støðutakan.

e). at flyta 5.000 tkr av løgukarminum konta 5775 á nýggja projektkontu.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 21. januar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle tekur undir við Mantamálanevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, mælir til at skifta grásliki á ovara vølli og at fáa ljósviðurskiftini í rættlag í ár og játta neyðuga peningin av konto nr. 6275.

Málið beint í býráðið.

**Ískoyti:**

**Viðv. Tórsvølli**
TK og FSF eru komin á samt um samstarvsavtalu um verkløgini við Tórsvøll Stadion. Sí hjálagt uppskot.

**Viðv. fjarhitaskipan til Tórsvøll**
Ítróttaanlegg eru í holt við saman við ráðgeva at gera eina fyribils loysn við at nýta tveir hitavekslarar, ið TK eigur frammanundan, og knýta teir í fjarhitaskipanina og vallarskipanina. Kostnaðirnir í hesum umfari eru arbeiðsløn at gera arbeiðið, umframt útvegan av frostvesku til hitaskipanina í vøllinum. Kostnaðurin í hesum umfarinum verður mettur til 200 tkr. Um royndin eydnast væl, skal støða takast til, um hetta er ein nøktandi og varandi loysn. Talan er um eina loysn, ið gevur umleið 1,4 MW og gevur eisini fjarhita til hornabygningin á Tórsvølli, har skipanin er staðsett.

**Viðv. verkløgunum annars á Tórsvølli**
Umsitingin saman við ráðgeva er í holt við at fyrireika og bjóða út arbeiðini viðv. nýggjum graslíki, flyting av sprinklaraskipanini, umframt útvegan av nýggjum stórskíggja. Væntandi verður klárt at taka støðu til tilboðini í mars.

**Viðv. verkløgum á Ovara vølli**
Fyrireikingar eru í gongd viðv. gerð av avtalum um gerð av mastrafundamenti í eina horninum á Ovara vølli, móti B36 húsinum. Væntandi verður tað arbeiðið útint á sumri 2020. Ráðgevi er eisini í holt við at

fyrireika og bjóða út verkløgini við Ovara vøll. Væntandi verður klárt at taka støðu til innkomin tilboð í mars.

**Stórskíggi til ovara vøll**
Umsitingin hevur viðgjørt møguleikan at leiga ein skíggja. Mett verður hóskandi at útvega ein stórskíggja til ovara vøll beinanvegin. Ítróttanlegg heintar inn tilboð.

**Umhvørvisatlit**
Umhvørvisdeildin hevur gjørt vart við, at TK hevur tikið undir við sonevndu KIMO ásetingunum (sí hjálagt skjal) fyri at minka um dálking frá graslíkisvøllum. Tað verður kannað nærri, hvussu TK á frægasta vís kann betra um umhvørvisviðurskiftini í sambandi við verkætlanirnar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:
a). at taka undir við samstarvsavtaluni við FSF
b). at heimila umsitingini at útinna fyribils loysn viðv. íbinding av fjarhitaskipan til Tórsvøll.
c). at heimila umsitingini at útvega stórskíggja til ovara vøll við leiguavtalu.
Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Atkvøtt varð um tilmælini frá fíggjarnevndni 22. januar 2020 og 1. apríl 2020, og vórðu tey einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
20. apríl 2020 var licitatitón uppá endurnýggjan av graslíkisvøllinum, og annað viðkomandi í hesum sambandi, til Ovara vøll í Gundadali.

Seks feløg vóru boðin at bjóða. Trý lótu inn tilboð.

Hesi vóru:
Laiderz Aps. (filial skrásett í FO)
Metatron EHF/Polytan Danmark A/S
Unisport Scandinavia A/S / Jónfinn Olsen

Í hjálagda fylgiskjalið sæst licitatiónsprotokollin.

Ráðgevin og umsitingin hava viðgjørt tilboðini og er hjálagda tilmæli komið frá ráðgevanum.

Mælt verður til at Laiderz Aps. fær møguleikan at gera sáttmála um verkætlanina. Hetta tí at felagið hevur lægsta boð og at dygd v.m. er í samsvari við krøvini í útbjóðingartilfarinum. Sama felag vann eisini útboðið seinast TK bjóðaði út – tá graslíki v.m. til nýggja Hoyvíksvøll.

Tá verkætlanin var boðin út, var ávís óvissa um standin á stoytdoyvingarlagnum, men er ráðgevin komin eftir, at tað sera sannlíkt er tørvur á at skifta tað nú og er tað tí tikið við.

Vegna økt krøv til burturbeining av verandi tilfari og ávís óvissa kring kostnaðin fyri sjálva innlatingina til Brennistøðina og møguliga endurnýtslu, verður mælt til at kostnaðurin fyri burturbeining (pos. 2.5 og 2.6) ikki verður partur av sáttmálanum, men at TK sjálvt ger avtalu um tað. Loysnin er antin at senda tilfarið samlað til endurnýtslu ella at gera sortering í Føroyum. Hetta verður kannað nærri komandi vikurnar.

Áljóðandi er sáttmálin (høvuðstilboð Laiderz) sostatt: 3.235.660 kr. (uttan kommunalt MVG)
Harumframt er sett av 900 tkr. til ráðgeving, ókent (herundir burturbeining v.m.) og kommunalt MVG.

**Áleggingartíðspunkt**
Arbeiðið verður ætlandi gjørt frá umleið mánaðarskiftinum juni/juli og umleið 4 vikur fram. Ætlanin er avstemmað við HB og B36 og FSF. Í juni 2020 vera fyrireikingar gjørdar viðv. komandi sprinklaraskipanini, so tað ikki kemur í vegin seinni og er klárt tað hetta verklagið verður útint.

**Fíggjar- og búskaparviðurskifti**
Á projektkontu L57031 eru 5.000 tkr. tøkar. Hetta inniber sostatt at tað, sum var í ætlanini fyri 2020 ikki letur seg gera fult út í 2020. Til ein komandi fund kemur tilmæli um restina av verkløgunum í Gundadali.

**Umhvørvisviðurskifti**
Samskifti hevur verið við Umhvørvisdeildina um betranarátøk til frama fyri betri umhvørvisvernd móti dálking frá mikroplasti og verða ymisk tiltøk framd í 2020 og 21 í hesum sambandi.

**Farsóttarstøðan**
Vegna serligu støðuna er ávís óvissa kring nøkur viðurskifti, ið annars ikki eru vanlig. Roynt verður at taka neyðug fyrilit tí viðvíkjandi. Í evsta lagi kann tað viðføra meirkostnaðir.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndin til at samtykkja at taka av høvuðstilboðnum frá Laiderz Aps. og at gera sáttmála við felagið á 3.235.660 kr. (uttan kommunalt MVG) at fíggja av projektkontu L57031. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

# 81/20 Innkomuvegurin kommunali parturin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 18/20 | 20/00776-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 103/20 | 20/00776-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 81/20 | 20/00776-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.05.2020 | 93/20 | 20/00776-1 |

**Upprunin til málið:**
Innkomuvegurin er gamalt mál, ið snýr seg um landsvegin og skipanina av ferðsluni á landsvegnum framvið høvuðsstaðnum, og til og úr høvuðsstaðnum.
Ymiskar loysnir og linjuføringar hava verið viðgjørdar, og Tórshavnar kommuna hevur havt serstøk ynski um ymiskar íbindingar.
Í 2016 gjørdu Landsverk og tekniska fyrisiting eitt uppskot til loysn og semju fyri loysnir, soleiðis at komast kundi á mál við innkomuvegnum, áðrenn Eysturoyartunnilin skuldi bindast í.
Hvørgin parturin hevur samtykt ætlanina, sum tískil ikki er bindandi millum partarnar.
Uppskot til loysn av innkomuvegnum, sum umsitingin hjá Landsverk og TK hava arbeitt við nú í 2019-2020 byggir uppá semjuna frá 2016, tó við tillagingum í mun til viðkomandi ætlanir sum nú eru og ynski sum eru frá báðum pørtunum.

Ferðslan í Føroyum økist støðugt, og er gongdin í talinum av skrásettum akførum smb. Hagstovu Føroya:

| Árstal | Skrásettir bilar í Føroyum | |
| --- | --- | --- |
| | Persónbilar | akfør íalt |
| 2000 | 14.087 | - |
| 2010 | 19.873 | 29.891 |
| 2015 | 21.417 | 31.742 |
| 2019 | 25.226 | 37.292 |
| 2020 (mars) | 25.972 | 38.963 |

Sambært nýggjastu tølunum í 2020 heldur økingin fram.

Loysnin á innkomuvegnum er meira átrokandi nú tað nærkast at Eysturoyartunnilin verður liðugur og tikin í nýtslu, tí umframt økta bilatalið, fer ferðslan væntandi at gera eitt lop í sambandi við at sambandið verður betri á meginøkinum.

Løgtingið hevur játtað 11,0 mió. kr. til innkomuvegin á hvørjari síðu av Eysturoyartunlinum, og hava Landsverk og Tórshavnar kommuna arbeitt í felag við at raðfesta upphæddina, ið er sett av Streymoyarmegin.
Neyðugt er eisini, at Tórshavnar kommuna játtar neyðuga upphædd fyri at fremja tey átøk, ið Tórshavnar kommuna eigur ábyrgdina av í mun til Innkomuvegin.
*Sí skjal nr. 20/00778-1 Innkomuvegur radfesting*

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í samgonguskjalinum stendur at "Endalig loysn skal finnast til vegainnføringina frá Eysturoyartunlinum", og er hetta liður í tí arbeiðinum.
Landsverk og tekniska fyrisiting hava í felag gjørt uppskot til raðfesting av játtanini frá Føroya Løgtingi til innkomuvegin, og er neyðugt at Tórshavnar kommuna játtar neyðuga upphædd til at gera kanningar av hvussu íbindingarnar, sum Tórshavnar kommuna varðar av, skulu loysast og leggjast til rættis, soleiðis at tær verða gjørdar saman við innkomuvegnum.

Neyðugt er at íbindingar tryggja at ferðslan verður spjadd yvir ymisku høvuðsvegirnar í Havnini, soleiðis at hon ikki stúgvast á fáum vegum.
*Sí skjal nr. 20/00778-2 trafikmodel-forskellige scenarier*

Raðfestingin er gjørd við støði í nyttuvirðinum fyri ferðsluna í Havnini. Raðfesting 1, er sambandið millum Villingadalsveg og Klingruna, og vil hetta lætta um trýstið sum er á Løgmannabreyt og Flatarvegin sum er í dag. Tá hetta sambandið er komið, ber eisini til at umleggja bussleiðina, soleiðis at hon virkar betri.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Føroya landsstýri hevur sett 11,0 mió. kr. av í 2020 til innkomuvegin Streymoyarmegin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*20/00778-1 Innkomuvegur raðfesting*
*20/00778-2 Trafikmodel - forskellige scenarier*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
- at tikið verður undir við raðfestingunum, sí skjal 20/00778-1,
- at játtaðar verða 800.000 kr. av konto 8175 Vegir, L00001 Løgukarmur fyri árið, til nýggja verkætlan *Innkomuvegur Kommunali parturin*, til
  uttanhýsis ráðgeva, at gera neyðugar kanningar, prosjektering av teimum fyrstu íbindingunum
- kostnaðarmeting uppá at prosjektera og gera íbindingarnar, sum Tórshavnar kommuna varðar av, soleiðis at málið kann leggjast fyri nevnd aftur, fyri at fáa neyðuga játtan til prosjektering og gerð av íbindingum
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Rætting er til “Upprunin til málið” omanfyri

**“Teksturin:** Í 2016 gjørdu Landsverk og tekniska fyrisiting eitt uppskot til loysn og semju fyri loysnir, soleiðis at komast kundi á mál við innkomuvegnum, áðrenn Eysturoyartunnilin skuldi bindast í.
Hvørgin parturin hevur samtykt ætlanina, sum tískil ikki er bindandi millum partarnar.
Uppskot til loysn av innkomuvegnum, sum umsitingin hjá Landsverk og TK hava arbeitt við nú í 2019-2020 byggir uppá semjuna frá 2016, tó við tillagingum í mun til viðkomandi ætlanir sum nú eru og ynski sum eru frá báðum pørtunum.”

**“Skal broytast til:** 7. Oktober 2016 gjørdu Samferðslumálaráðið og Tórshavnar kommuna avtalu um Innkomuvegin til Tórshavn
**skjal16/03841-1**
Avtalan varð samtykt í Tórshavnar býráð 20.06.2019, har heitt varð á landsmyndugleikarnar um at halda seg til avtaluna
**Skjal 14/01358-199**
Landsstýrismaðurin í Fíggjarmálum gjørdi á fundi við Tórshavnar kommunu 08.01.2020 vart við, at avtalan frá 7. Oktober 2016 ikki var samtykt í Løgtinginum, so ein loysn má finnast, sum báðir partar eru samdir um.
Uppskot til loysn av innkomuvegnum, sum umsitingin hjá Landsverk og TK hava arbeitt við nú í 2019-2020 byggir uppá semjuna frá 2016, tó við tillagingum í mun til viðkomandi ætlanir sum nú eru og ynski sum eru frá báðum pørtunum.”

**Skjøl:**
**14/01358-199 Samtykt býráðsfundur 20.06.2019**
**16/03841-1 undirskrivað avtala um innkomuvegin til Tórshavn millum Samferðslumálaráðið og Tórshavnar kommunu**

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

# 82/20 Lendisgøtur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 40/18 | 18/00992-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 82/20 | 18/00992-1 |
| 11 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 82/20 | 18/00992-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 81/18 | 18/00992-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 67/18 | 18/00992-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 36/19 | 18/00992-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 83/19 | 18/00992-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 68/19 | 18/00992-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 65/20 | 18/00992-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 06.04.2020 | 86/20 | 18/00992-1 |
| 9 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 58/20 | 18/00992-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ein mió. kr. eru avsettar á íløgum 2018 til lendisgøtur og verður mælt til at gera hesa raðfesting:
1. Sandá heimari partur av gøtuni 765 m
2. Part av 235 m ringgøtuni í Villingadalsfoss.

Kostnaður er mettur til 1 mió. kr.

Ad. 1. Framhald og nýgerð av gøtu við Sandá, nýgerð av gøtu uml. 765 m.
Búnaðarjørð, krevur skrivligt samtykki frá Búnaðarstovuni og festara.

Ad. 2. Nýgerð av gøtu við Villingadalsfoss, niðan á fossin. So langt sum 235.000 kr. røkka.
Búnaðarjørð, krevur skrivligt samtykki frá Búnaðarstovuni og festara.

Havast skal í huga ognarviðurskifti, brúksrættindi, viðlíkahaldsskyldur, kostnaður og fígging. Avgerandi er, at eigarin av lendinum gevur loyvi, har sum kommunan ikki eigur, og at ferðslurættindi verða lýst á farleiðina, antin sum servituttur ella onnur avtala.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at játtaðar verða kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til framhaldandi gerð av lendisgøtum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**

Í 2019 er ætlanin at fara undir gøtuna við Sandá, sum varð sett á breddan í 2018, umframt gøtuna frá gl. vatnbrunninum yvir til ánna í Villingadali.

Fyri gøtuna við Sandá hevur umsitingin í 2018 fingið til vega tilboð, áljóðandi 2.9 mió. kr. Arbeiðið varð raðfest í 2018, og er nakað av arbeiðinum longu gjørt. Játtanin í 2019 skal fevna um írestandi fígging, soleiðis at allur teinurin kann raðfestast.

Gøtan frá gl. vatnbrunninum yvir til ánna í Villingadali er mett til at kosta einar 500.000 kr.

Írestandi fígging fyri 2019 sæst niðanfyri:

| | |
|---|---|
| Gøta við Sandá | 2.900.000 kr. |
| Gøta við Sandá (goldið) | 701.250 kr. |
| Gøta Villingadal (meting) | 500.000 kr. |
| Írestandi játtan fyri 2018 | 1.200.000 kr. |
| **Eftir at játta fyri 2019** | **1.500.000 kr.** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 1.5 mió kr. av íløgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019, og at beina málið **í** býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býraðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið fyri 1.9 mill. í 2019, á strekkinum fram við Sandá. Stígur kom í við at fáa endaligt loyvi frá lendisánara til seinasta strekkið. Sambært tilboði frá arbeiðstakara er kostnaðurin til seinasta strekkið 1,0 mill. kr. eftir. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Sandá

Lendisgøtan við Villingadal bíðar eftir loyvi frá Búnaðarstovuni. Rykt er fleiri ferðir eftir loyvi, og hevur Búnaðarstovan boðað frá, at loyvi verður sent í næstum. Arbeiðið er mett til 500.000,- kr. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Villingadal

Ynski er at gera gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna. Rás er traðkað, men lendisviðurskiftini og hall á lendinum gera tað neyðugt at gera trappur í støðum í lendinum. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 til Rossagøtuna

**Skjøl:**
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Sandá
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Villingadal
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 til Rossagøtuna

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at framflyta avlop frá 2019 1.227 mió. kr. og at játta 1.00 mió. kr. av íløgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019, og at beina málið **í** býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 06. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Rættleiðing til gøtuna við Sandá
Gøtan við Sandá varð boðin út í 2018.
2 tilboð komu inn, lisitatión var 6. novembur 2018:
Tikið varð av lægra tilboðnum, sum var áljóðandi 2.221.250 kr.

**Mettur kostnaður var sostatt:**

| | |
|---|---|
| Tilboð | 2.221.250 kr. |
| Mettur eykakostnaður | 678.750 kr. |
| **Mettur kostnaður íalt** | **2.900.000 kr.** |

**Status:**

| | |
|---|---|
| Goldið higartil tilboð | 1.765.550 kr. |
| Goldið higartil eyka (t.e. Eyka hegn, eyka atkoma frá AB vøllinum.o.a. | 258.520 kr. |
| **Goldið higartil** | **2.024.070 kr.** |

| | |
|---|---|
| Arbeiði eftir av gera tilboð | 455.700 kr. |
| Eftir til eyka | 420.230 kr. |
| **Eftir av játtan** | **875.930 kr.** |

Henda upphædd er íroknað framflutta upphædd frá 2019

Avlop verður brúkt til Lendisgøturnar planlagdar í 2020. T.e. gøtan í Villingadali og niðan á Rossagøtuna.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

# 83/20 Umsókn um yvirtøku av vegi matr. nr. 699p, Lítlatrøð, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 14/20 | 19/00746-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 81/20 | 19/00746-2 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 83/20 | 19/00746-2 |

**Upprunin til málið:**
Umsókn um at kommunan yvirtekur vegin

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Eigararnir av matr. nr. 699p Tórshavn ynskja, at kommunan yvirtekur vegin við til hoyrandi installatiónum. Sí kort 19/00746-5

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ongin viðmerking

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fólk frá umsitingin hava verið á staðnum og góðtekur at vegurin verður yvirtikin í núverandi standi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ongin viðmerking

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin viðmerking

**Umhvørvisárin**
Ongin viðmerking

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kommunan yvirtekur vegin Lítlatrøð matr. nr. 699p, Tórshavn, uttan kostnað fyri kommununa og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

# 84/20 Endurgjald av barnaansingargjaldi - Korona

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 104/20 | 20/01286-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 84/20 | 20/01286-1 |

**Upprunin til málið:**
Dagstovnarnir í Tórshavnar kommunu lótu vegna korona-smittuna aftur mánadagin 16. mars. Í hesum tíðarskeiðinum hava fá børn verið í ansing. Virksemið á dagstovnaøkinum hevur verið opið fyri børnum, hvørs foreldur skulu røkja arbeiðsligar skyldur, ið neyðugar eru í samfelagnum og tí hava haft tørv á tilboði á dagstovni til børnini. Nú er so ætlanin at lata upp aftur mánadagin 20. apríl.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fyri páskir boðaði landsstýrið frá, at dagstovnar lata upp mánadagin 20. apríl 2020. Í tilmælinum frá landsstýrinum verður sagt, at dagstovnaøkið letur upp mánadagin 20. apríl, og at foreldur, sum vilja hava børn síni heima, hava síni børn heima. TK fylgir tilmælinum frá landsmyndugleikunum, og tí fara tey foreldur, ið ynskja tað, aftur at kunna fáa børn síni ansaði í dagstovnunum.

Viðvíkjandi foreldragjøldum er støðan tann, at foreldragjaldið fyri ansing verður goldið forút, tí hava foreldur goldið bæði fyri mars og apríl. Spurningur er settur við um foreldur skulu gjalda fyri eina tænastu, tey ikki hava fingið hesa tíðina.

Um foreldragjaldið fyri mai ikki verður kravt upp, soleiðis at foreldur fáa ein ókeypis mánað orsakað av, at dagstovnarnir hava verið afturlatnir er kostnaðurin uml. 2,8 mió. kr. Minni inntøkan av ikki at krevja mai-foreldragjaldið inn, verður mett til netto umleið 2,8 mió.kr. Tá er hædd tikið fyri minni kostnaði til systkinaavsláttur og fíggjarligt fríplass.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. april 2020 | Blað nr.: 339 |
| | Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til, at støða verður tikin til hvørt foreldragjaldið skal endurrindast, soleiðis at foreldur ikki fáa uppkrav fyri mai mánaða 2020. Upphæddin verður fíggjað av 20910 Aðrar inntøkur.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at endurrinda foreldragjaldið, soleiðis at foreldur ikki fáa uppkrav fyri mai mánaða 2020 og at fíggja upphæddina av konto 20910 Aðrar inntøkur.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

# 85/20 Val av einum limi og tiltakslimi í SEV-nevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 21/16 | 16/04617-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 85/20 | 16/04617-1 |

**Málslýsing:**
**4. grein**

NEVNDIN

Stk. 1. Til at hava yvirstjórn í felagsins viðurskiftum verður á aðalfundinum vald ein nevnd sambært stk. 2.
Stk. 2. Í nevndina verða valdir sjey limir soleiðis, at Vága, Streymoyar, Eysturoyar, Norðoya og Sandoyar sýslur hvør velja ein, Suðuroyggin ein og Tórshavnar kommuna ein nevndarlim.

Valið fer fram á tann hátt, at limakommunurnar í hvørjum øki sær seta upp valevnir og atkvøða um hesi.

Um nevndarlimur flytur úr økinum, har hann er valdur, tekur varalimurin við, og nýggjur varalimur verður valdur.

Meirilutaval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja ein lim og ein tiltakslim í Sev-nevndina.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald varð Marin Katrina Frýdal og sum varalimur Gunnvør Balle.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald varð Marin Katrina Frýdal og sum varalimur Gunnvør Balle.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald varð Marin Katrina Frýdal og sum varalimur Gunnvør Balle.

**Ískoyti:**
Av tí at Gunvør Balle fer frá sum varalimur skal nýggjur varalimur veljast.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja ein tiltakslim í Sev-nevndina.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Atkvøtt varð millum uppskot frá Anniku Olsen um at velja Jákup Dam í SEV-nevndina, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, ongari ímóti og seks blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus og Annfinn Brekkstein.

| | Býráðsfundur<br>30. april 2020 | Blað nr.: 342 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

## 86/20 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.02.2020 | 64/20 | 20/00203-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 48/20 | 20/00203-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 83/20 | 20/00203-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 106/20 | 20/00203-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 86/20 | 20/00203-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 27. februar 2020:** Framlagt.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar og mars at góðkenna.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Framlagt og góðkent.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Heðin Mortensen | |